SEV

Framleiðsluroknskapur 2018

# Vegurin slóðaður fyri grønum framburði



NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI 541 705

**Ársfrágreiðing og ársroknskapur 2018**
Ársaðalfundur 24. apríl 2019
Myndir: Ólavur Frederiksen, Jens Kristian Vang, Finnur Justinussen, Alan Brockie, Høgni í Jákupsstovu, Minesto, Høgni Heinesen, Landsbyggifelagið, Kári Durhuus, Benjamin Rasmussen, Otto West, Pauli Djurholm, Eyðna J.M. Joensen og SEV.

Umbróting, prent og liðuggerð: Føroyaprent

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
Svanamerktur prentlutur 541 705

# Framleiðslu-
# roknskapur 2018

# Innihaldsyvirlit


| | |
|---|---|
| Upplýsingar um felagið | 4 |
| Leiðsluátekning | 5 |
| Átekning frá óheftum grannskoðara | 6 |
| Høvuðs- og lyklatøl | 8 |
| Leiðslufrágreiðing | 9 |
| Nýttur roknskaparháttur | 23 |
| Rakstrarroknskapur 1. januar – 31. desember | 27 |
| Fíggjarstøða 31. desember | 28 |
| Peningastreymsuppgerð | 30 |
| Notur | 31 |

# Elfelagið SEV Framleiðsluroknskapur fyri 2018

## Innihald

| | |
|---|---|
| Leiðsluátekning | 5 |
| Átekning frá óheftum grannskoðara | 6 |
| Høvuðs- og lyklatøl | 8 |
| Leiðslufrágreiðing | 9 |
| Nýttur roknskaparháttur | 23 |
| Rakstrarroknskapur 1. januar - 31. desember | 27 |
| Fíggjarstøða 31. desember | 28 |
| Peningastreymsuppgerð | 30 |
| Notur | 31 |


## Felagið

Elfelagið SEV
Fyrisiting:
Landavegur 92
Postboks 319
FO-110 Tórshavn
Telefon: 346800
Heimasíða: www.sev.fo
Teldupostur: sev@sev.fo
Heimstaður: Vestmanna
Roknskaparár: 01.01-31.12
V-tal: 331538

## Nevnd

John Zachariassen, formaður (COB)
Hans Jákup Johannesen, næstformaður
Marin Katrina Frýdal
Jónsvein Hovgaard
Sune Jacobsen
Vinjard Tungá
Kristian Eli Zachariasen

## Leiðsla

Hákun Djurhuus, stjóri (CEO)
Bogi Bendtsen, deildarstjóri fyri fyrisiting (CFO)
Jón Nielsen, deildarstjóri fyri net (COO)
Heri Mortensen, deildarstjóri fyri framleiðslu (CPO)

## Grannskoðan

P/F Januar
Løggilt grannskoðanarvirki
Óðinshædd 13, Postboks 30, FO-110 Tórshavn
Telefon: 31 47 00 Telefaks: 35 17 01
Teldupostur: januar@januar.fo
Heimasíða: www.januar.fo

## Leiðsluátekning

Nevndin og stjórnin hava í dag lagt fram framleiðsluroknskapin fyri roknskaparárið 1. januar–31. desember 2018 hjá elfelagnum SEV. Framleiðsluroknskapurin er eisini ein partur av ársfrásøgnini hjá elfelagnum SEV.

Framleiðsluroknskapurin er gjørdur í samsvari við ársroknskaparlógina.

Tað er okkara fatan, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi, og at framleiðsluroknskapurin gevur eina rættvísa mynd av ognum, skyldum og fíggjarligu støðu pr. 31. desember 2018 og av úrslitinum av framleiðsluvirkseminum hjá felagnum fyri roknskaparárið 1. januar – 31. desember 2018.

Leiðslufrágreiðingin inniheldur, eftir okkara fatan, eina rættvísandi frágreiðing um tey viðurskifti, sum frágreiðingin umrøður.

Ársfrásøgnin verður løgd fyri ársaðalfundin við tilmæli um góðkenning.

Tórshavn, hin 5. apríl 2019

### Stjórn

*Hákun Djurhuus*
*Stjóri*

### Fíggjarleiðsla

*Bogi Bendtsen*
*Deildarstjóri fyri fyrisiting*

### Nevnd

*John Zachariassen*
*Formaður*

*Hans Jákup Johannesen*
*Næstformaður*

*Marin Katrina Frýdal*

*Jónsvein Hovgaard*

*Sune Jacobsen*

*Vinjard Tungá*

*Kristian Eli Zachariasen*

# Átekning frá óheftum grannskoðara

## Til leiðsluna í Elfelagnum SEV

### Niðurstøða

Vit hava grannskoðað framleiðsluroknskapin, sum inniheldur upphæddir fyri rakstrarroknskap, fíggjarstøðu, peningastreym og notur fyri Elfelagið SEV fyri roknskaparárið 1. januar–31. desember 2018. Upphæddirnar í Framleiðsluroknskapinum eru partur av ársfrásøgnini fyri Elfelagið SEV fyri tíðarskeiðið 1. januar–31. desember 2018, sum vit hava grannskoðað.

Tað er okkara fatan, at framleiðsluroknskapurin fyri Elfelagið SEV fyri tíðarskeiðið 1. januar–31. desember 2018 á øllum týðandi økjum er gjørdur í samsvar við tær roknskaparreglur, sum verða lýstar í nýttum roknskaparhátti.

### Grundarlag fyri niðurstøðuni

Grannskoðanin er løgd til rættis í samsvari við altjóða standardir um grannskoðan og aðrar ásetingar, sum eru galdandi í Føroyum. Okkara ábyrgd eftir hesum standardum og ásetingum er nærri greidd frá í niðanfyri standandi broti "Ábyrgd grannskoðarans av at grannskoða netroknskapin". Vit eru óheft av felagnum samsvarandi altjóða etisku krøvunum fyri grannskoðarar (etisku reglunum hjá IESBA) og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, eisini hava vit hildið hinar etisku skyldurnar hjá okkum, sum ásettar eru í hesum standardum og krøvum. Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kunnu vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

### Áherðsla á viðurskifti í framleiðsluroknskapinum – nýttur roknskaparháttur

Vit skulu gera vart við upplýsingarnar í innganginum av hesari váttan, harav tað framgongur, at framleiðsluroknskapurin er gjørdur eftir teimum roknskaparreglum, sum verða lýstar í nýttum roknskaparhátti.

Hesi viðurskifti hava ikki ávirkan á okkara niðurstøðu.

### Ábyrgd leiðslunnar av framleiðsluroknskapinum

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera framleiðsluroknskapin samsvarandi teimum roknskaparreglum, sum verða lýstar í nýttum roknskaparhátti. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av tí innanhýsis eftirliti, ið leiðslan metir skal til, fyri at framleiðsluroknskapurin kann gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

### Ábyrgd grannskoðarans av at grannskoða framleiðsluroknskapin

Okkara endamál er at fáa grundaða vissu fyri, at framleiðsluroknskapurin í síni heild ikki hevur týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, og at geva eina grannskoðanarátekning við eini niðurstøðu. Grundað vissa er vissa við høgum stigi, men er ikki full trygd fyri, at ein grannskoðan, sum verður gjørd eftir ásetingunum í altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, altíð kann avdúka týðandi skeivleikar, tá slíkir eru. Skeivleikar kunnu koma fyri orsakað av sviki ella mistøkum og kunnu metast at vera týðandi, um tað kann væntast, at teir hvør sær ella saman ávirka fíggjarligu avgerðirnar, sum roknskaparbrúkararnir taka við støði í framleiðsluroknskapinum.

Sum ein liður í grannskoðanini, ið verður gjørd eftir altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, gera vit yrkisligar metingar og hava eitt yrkisligt ivingarsemi undir grannskoðanini. Har vit eisini:

- Eyðmerkja og meta um váðar fyri týðandi skeivleikum í framleiðslu¬rokn¬skapinum, uttan mun til um skeiv¬leikarnir standast av sviki ella mistøkum, leggja til rættis og gera tey grann¬skoðanararbeiðir, sum hesir váðar krevja umframt fáa til vega tey grannskoðanarprógv, sum eru nøktandi at vera grundarlag undir okkara niðurstøðu. Váðin fyri ikki at varnast týðandi skeivleikar, sum standast av sviki, er størri, enn tá talan er um týðandi skeivleikar, sum standast av mistøkum, tí svik kann vera av samanløgdum ráðum, skjalafalsan, tilætlaðari burtur¬úr¬legging, vill¬leiðingum ella við at skúgva innanhýsis eftirlitið til viks.

- Fáa eina fatan av innanhýsis eftirlitinum, sum er viðkomandi fyri grannskoðanina, fyri at kunna leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum, men ikki fyri at kunna gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum.

- Taka støðu til um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, og um tær roknskaparligu metingarnar og tilhoyrandi upplýsingar, sum leiðslan hevur gjørt eru rímiligar.

Vit samskifta við ovastu leiðsluna um millum annað vavið á

ætlaðu grannskoðanini, og nær grannskoðað verður, og eisini um týðandi eygleiðingar, herundir um møguligar týðandi manglar í innanhýsis eftirlitinum, sum vit eyðmerkja undir grannskoðanini.

Tórshavn, hin 5. apríl 2019

P/F JANUAR

løggilt grannskoðanarvirki

| | |
|---|---|
| Hans Laksá | Jógvan Amonsson |
| Statsaut. revisor | Statsaut. revisor |

# Høvuðs- og lyklatøl

| Upphæddir í tkr. | 2018 | 2017 | 2016 | 2015 | 2014 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarroknskapur** | | | | | |
| Nettosøla | 259.063 | 279.101 | 265.526 | 234.920 | 278.328 |
| Úrslit áðrenn av- og niðurskrivingar | 94.486 | 135.653 | 152.882 | 95.673 | 85.070 |
| Rakstrarúrslit | 20.265 | 67.830 | 93.722 | 36.443 | 37.704 |
| Fíggjarligir postar, netto | -9.340 | -9.488 | -12.116 | -11.221 | -11.773 |
| **Ársúrslit** | **10.650** | **57.784** | **81.466** | **25.222** | **25.931** |
| | | | | | |
| **Fíggjarstøða** | | | | | |
| Fíggjarstøðujavni | 1.565.760 | 1.347.941 | 1.137.999 | 1.049.924 | 997.460 |
| Eginogn | 789.767 | 779.117 | 678.482 | 699.806 | 632.746 |
| Langfreistað skuld | 437.369 | 358.941 | 358.941 | 349.676 | 364.477 |
| | | | | | |
| **Lyklatøl *)** | | | | | |
| Renting av eginogn | 1,4% | 7,9% | 11,8% | 3,8% | 4,3% |
| Ognaravkast | 1,4% | 5,5% | 8,6% | 3,6% | 4,0% |
| Nettoskuld / EBITDA | 4,7 | 2,6 | 2,3 | 3,7 | 4,3 |
| Ognarumferð | 0,17 | 0,21 | 0,23 | 0,22 | 0,28 |
| Eginognarpartur | 50,4% | 65,9% | 59,6% | 66,7% | 63,4% |

*) Lyklatølini eru útroknað í samsvari við Den Danske Finansanalytikerforenings „Anbefalinger & Nøgletal 2010“.

# Leiðslufrágreiðing

## Høvuðsvirksemið

Elfelagið SEV er eitt interkommunalt lutafelag, ið hevur til endamáls at fáa til vega elmegi og býta hana millum íbúgvarnar í limakommununum. Sambært viðtøkum elfelagsins skal endamálið fremjast sambært vinnuligum meginreglum á búskaparliga tryggum støði og við fyriliti til náttúru og umhvørvi.

Í loyvunum hjá SEV fyri einstøku framleiðslueindirnar framgongur, at av roknskapinum skal framganga, um framleiðslueindin hevur yvirskot ella undirskot.

Hesin roknskapur fyri framleiðsluvirksemið hjá SEV er ein partur av samlaða roknskapinum hjá SEV. Frágreiðingin fevnir um framleiðsluvirksemið hjá felagnum í tíðarskeiðinum 1. januar 2018 - 31. desember 2018.

## Gongdin í virkseminum og fíggjarligu viðurskiftunum

## Framleiðsla og Inntøkur

Talva 1 vísir gongdina í framleiðsluni í GWt seinastu 5 árini.

Elframleiðslan máld í GWt fyri 2018 var 352,0 móti 334,3 GWt í 2017 ella ein vøkstur upp á 17,7 GWt svarandi til, at SEV í 2018 hevði ein framleiðsluvøkstur á 5,3%, tað sama sum í 2017 yvir alt landið.

Í meginøkinum vaks framleiðslan 5,1%, og í Suðuroy vaks framleiðslan við 8,0%. Mesta lastin í meginøkinum var skrásett til 59,9 MV í 2018 og 56,7 í 2017, meðan hendan í Suðuroy er vaksin frá 4,7 MV í 2017 til 8,3 MV í 2018. Vøksturin í framleiðsluni og av mestu last skyldast at Varðin Pelagic er farið at framleiða aftur eftir eldsbrunan í juni 2017.

Í 2014 var nógv avfall og gongdin við nógvum avfalli helt fram í 2015, serliga nógv avfall var alt várið og fram til summarið. Frá summar til heyst var avfallið at rokna sum eitt vanligt miðalár, meðan um veturin var aftur nógv avfall. Stórt sæð alt 2016 var veðrið gott við minni av vindi og lítið av avfalli. Hetta ávirkaði framleiðsluna av elmegi við vindi og vatni skeiva vegin.

Elframleiðslan við vatni í 2017 var nakað minni enn ætlað, men nakað meiri enn í 2016. Hetta var grundað á viðlíkahald upp á vatnbyrgingarnar í Vestmanna tilhoyrandi Fossáverkið og vatnbyrgingina til Verkið á Strond. Samstundis var veðrið um várið og summarið gott, og hetta ávirkaði elframleiðsluna við vatni.

Í 2018 framleiddi SEV 48,8% av elorkuni burtur úr vatni og vindi, og oljuriknu verkini framleiddu sostatt 51,2%. Talan er um minni afturgongd uppá 2,3 prosentstig, men samstundis øktist elnýtslan við 5,3% sammett við 2017 og í GWt øktist grøna orkuframleiðslan 1,0 svarandi til 0,6%.

Avfallið fyrstu mánaðirnar í 2018 var minni enn í 2017 eins og nógv frost var fyrstu mánaðirnar í árinum, sum viðførdi frostbinding av vatninum, sum aftur ávirkaði elframleiðsluna burturúr vatni skeivan vegin. Minni vatn og frostbinding hava viðført, at SEV ikki hevur framleitt eins nógv el burturúr vatni, sum ætlað. Í 2018 hava dagføringar eisini verið á vatnturbinuni á verkinum norðuri á Strond í mai mánaða. Eingi onnur vatnorkuverk hava

| Talva 1. Avroknað søla í GWt | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | Broyting í GWt í mun til 2017 | Broyting í % í mun til 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Avroknað søla til kundar í GWt | 283,8 | 288,1 | 291,4 | 306,5 | 320,5 | 14,0 | 4,6 |
| Nettap og eginnýtsla í GWt | 21,6 | 26,3 | 26,0 | 27,8 | 31,5 | 3,7 | 13,2 |
| **Framleiðsla tilsamans í GWt pr. ár** | **305,4** | **314,4** | **317,4** | **334,3** | **352,0** | **17,7** | **5,3** |
| Harav við termiskari | 150,2 | 125,5 | 158,9 | 163,4 | 180,1 | 16,7 | 10,2 |
| *% termisk* | *49,2* | *39,9* | *50,1* | *48,9* | *51,2* | | |
| Harav við vatni | 120,7 | 133,1 | 106,3 | 111,2 | 108,1 | -3,2 | -2,8 |
| *% vatn* | *39,5* | *42,3* | *33,5* | *33,3* | *30,7* | | |
| Harav við vindi | 34,5 | 55,8 | 52,1 | 59,7 | 63,8 | 4,1 | 6,9 |
| *% vindur* | *11,3* | *17,7* | *16,4* | *17,8* | *18,1* | | |
| Grøn orka tilsamans | 155,2 | 188,9 | 158,4 | 170,9 | 171,9 | 1,0 | 0,6 |
| *% grøn orka* | *50,8* | *60,1* | *49,9* | *51,1* | *48,8* | | |

*Mynd 1: Elframleiðslan fyri alt landið frá 1954 til 2018*




*Mynd 2: Leypandi 12 mánaða elframleiðsla frá 1987 til 2018 fyri alt SEV.*



*Mynd 3: Elframleiðslan pr. íbúgva í Føroyum 1970-2018*




havt umvælingar ella dagføringar, og hava hesi tí framleitt orku alt árið, tó alt eftir hvussu nógv avfall hevur verið. Viðlíkahaldið á byrgingina á Strond bleiv liðug í 2018. Vanliga verður roknað við eini miðalframleiðslu upp á 114 GWt, og sostatt kann sigast, at elframleiðslan við vatni seinastu 3 árini ikki hevur verið á einum miðalstøði, sum SEV vanliga roknar við, og framleiðslan av el við vatni minkaði í 2018 og var tí ikki eins góð og vónað.

Elframleiðslan burturúr vindi er tann stórsta, sum SEV higartil hevur havt, síðani byrjað varð at framleiða el við vindi. Framleiðslan við vindorku í 2018 øktist 6,9 prosent sammett við 2017, og vindurin verður nú - eins og í 2017 - nógv betur gagnnýttur. 98,1% av vindinum í Húsahaga var fingin til høldar í 2018. Battarískipanin í Húsahaga, sum byrjaði í 2016, virkaði eisini væl í 2018. Samanborið við 2015, sum var fyrsta heila árið, har vindmyllurnar í Húsahaga vóru í rakstri – men uttan battaríksipanina – er talan um ein stóran vøkstur í gagnnýtsluni av vindinum, síðani SEV fór undir vindorkuframleiðsluna í Húsahaga.

Elframleiðslan gjøgnum nógvu árini hevur verið sveiggjandi, sum víst á mynd 1 yvir elframleiðsluna fyri alt landið frá 1954 til 2018.

Á myndini sæst, at ein støðugur vøkstur hevur verið í elframleiðsluni síðani 1954 og fram til kreppuna í 90'unum, tá ið elframleiðslan byrjar at fella orsakað fallandi nýtslu. Ikki fyrr enn í 1996 byrjar elframleiðslan aftur at vaksa, har hon í 2018 setur nýtt met við 352,0 GWt, sum er 17,7 GWt størri enn í 2017, sum higartil var besta árið.

Eisini sæst, at framleiðslan av elmegi úr vatni økist munandi við endanum av 80'unum orsakað nýggja Eiðisverkinum, sum tá byrjaði framleiðslu av elmegi við vatni. Framleiðslan við vatni økist aftur í 2002 til 2007 orsakað Eiði 3, fyri síðani at verða rættiliga støðug.

Í 2010 og í 2011 eru høvuðsumvælingar gjørdar á turbinur og rør á Fossáverkinum og á Heygaverkinum, eins og turbina 1 á Eiðisverkinum er dagførd í 2012, meðan turbina 2 er dagførd í 2013. Hesar dagføringar síggjast aftur í framleiðsluni á myndini, tí hon fellur í 2010 og 2011. Hartil skal sigast, at í 2010 og 2013 regnaði sera lítið í mun til onnur ár.

Í juni mánað 2012 tók felagið nýggju turbinu 3 í nýtslu á Eiðisverkinum, sum saman við Eiði 2 suður økir framleiðsluna av elmegi við vatni við umleið 14 GWt árliga. Tunnilsverkætlanin var liðug við ársenda 2013

Í november mánað 2012 var vindmyllulundin í Neshaga tikin í nýtslu, og hin 9. oktober 2014 var nýggja vindmyllulundin í Húsahaga tikin í nýtslu. SEV væntar sær nógv av hesum vindmyllulundum, og tíðarskeiðið hesar hava framleitt, hevur roynst væl.

Mynd 2 vísir mánaðarligu elframleiðsluna frá 1987 til og við desember 2018. Sum sæst, minkar framleiðslan í 2011, meðan hon veksur støðugt teir 12 mánaðirnar í 2012 fyri aftur at falla og veksa eitt vet í 2013, vøksturin heldur fram í 2014 til 2018. Í 2018 var vøksturin (eins og í 2017) 5,3%.

*Mynd 4: Elframleiðslan býtt eftir elverksøkjum í 2018*




*Mynd 5: Elframleiðslan býtt eftir vatnorkuverkum í 2018 uppgivið í % av allari vatnframleiddu orkuni.*



*Mynd 6: Mesta last og tøkur máttur fyri meginøkið 1957–2018.*




Mynd 3 vísir elframleiðsluna í Føroyum pr. íbúgva frá 1970 til 2018.

Myndin vísir sama mynstur sum mynd 1 og 2 av tí samlaðu elframleiðsluni fyri alt landið.

Felagið hevur framleiðsluverk kring landið, býtt upp á ymiskar framleiðslukeldur, so sum termisk, vatn og vind.

Mynd 4 vísir elframleiðsluna býtt eftir økjum í 2018.

Sum myndin vísir, verður størsti parturin av elframleiðsluni framleiddur á Sundsverkinum, meðan næst størsti parturin verður framleiddur við vindi, sum í 2018 var uppá 63,8GWt. Framleiðslan úr vatni samlað er upp á 108,1 GWt, meðan framleiðslan á Sundsverkinum var 151,0 GWt.

Mynd 5 vísir framleiðsluna býtt eftir vatnorkuverkum í 2018.

Á myndini framgongur, at Eiði er størsti vatnorkuframleiðari, síðani kemur Fossáverkið í Vestmanna. Verkið í Botni framleiðir 3,4% av elframleiðsluni við vatni.

SEV hevur veitingarskyldu. Hetta merkir, at felagið altíð skal hava nóg mikið av tøkum mátti til tess at nøkta eftirspurninginum av ravmagni.

Mynd 6 vísir mestu last og tøkan mátt fyri meginøkið frá 1957 til 2018.

Myndin vísir, hvussu nógvan tøkan mátt SEV hevur í mun til mestu elnýtslu. Orsøkin til at SEV hevur so nógvan tøkan mátt, er tí, at stórur partur av elframleiðsluni stavar frá óstøðugari orku. Tí er neyðugt at hava aðra orku tøka

Økingin í tøka máttinum í 2012 stavar frá nýggju turbinuni á Eiðisverkinum og vindmyllunum í Neshaga. Fallið í 2013 upp á 5,3 MW stavar frá niðurtøku av M3 á Sundsverkinum. Økingin í 2014 og 2015 stavar frá uppseting av tveimum nýggjum motorum á Sundsverkinum, fyri niðurtikna M3 motorin upp á 4,8 MW, umframt vindmyllunum í Húsahaga upp á 11,7 MW. Í 2016 var nýggi motoruin á Vágsverkinum tikin í nýtslu, og er hesin á 4,0 MV. Í 2018 var - eins og í 2017 - ongin øking av tøkum mátti.

Á mynd 7 sæst døgnlastin mikudagin 3. oktober 2018 í meginøkinum. Myndin vísir døgnlastina ein vanligan dag í 2018. Myndin vísir, at lastin er rættiliga jøvn frá kl. 09 á morgni til kl. 20:00 á kvøldi. Nógvu seinastu árini hevur døgnlastmyndin stórt sæð verið óbroytt.

Fyri at nøkta eftirspurninginum av elmegi, hevur SEV eina fjølbroytta maskinpark, sum umfatar motorar, vatnturbinur og vindmyllur.

*Mynd 7: Døgnlastin mikudagin 4. oktober 2017 í meginøkinum.*




## Inntøkur

Í 2011 fór SEV undir at gera sjálvstøðugar roknskapir fyri framleiðslu- og netpartin. Í hesum sambandi hevur felagið tikið hædd fyri at rokna vinning í framleiðslupartinum á sama hátt, sum kravt er í sambandi við vindorkuútboðini. Innrokningin av vinningi er fyri at geva eina rættvísandi mynd av rakstrinum hjá framleiðslupartinum sæð í mun til avkastkrav og virðisrøkt av ognunum hjá framleiðslupartinum. Tí er fyri fyrstu ferð vinningur roknaður av framleiðslupartinum mótvegis netpartinum í 2011.

Fyri framleiðslupartin merkir hetta, at hesin skal hava allan sín kostnað rindaðan íroknað kostnaðin fyri netumsitingina og netábyrgdina. Harumframt skal framleiðsluparturin hava eitt yvirskot svarandi til umleið 4-5% av primoeginpeninginum.

Kravið til roknaða vinningin í 2018 er 37,5 mió. kr. móti 34,5 mió. kr. í 2017, svarandi til 5,0% av primoeginpeninginum hjá framleiðslupartinum. 4-5% í vinningi metur SEV er eitt rímiligt avkast í løtuni í mun til inflatión og aðrar íløgumøguleikar.

Samlaða úrslitið fyri framleiðslupartin gjørdist 10,7 mió. kr., sum er grundað á kravið um eginfígging.

Sambært elveitingarlógini skal netvirksemið fíggjarliga hvíla í sær sjálvum soleiðis, at inntøkurnar eru hóskandi til at gjalda fyri rakstur og ætlaðar neyðugar íløgur. Fyri netpartin merkir hetta, at hesin skal hava eina inntøku svarandi til tær útreiðslur netparturin hevur soleiðis, at netparturin kann gjalda fyri raksturin umframt, at netparturin skal hava inntøkur til at kunna rinda fyri ætlaðar neyðugar íløgur. Inntøkurnar fyri neyðugu íløgurnar taka støði í kravinum til eginfígging.

Tá farið verður undir at gera íløgur, er neyðugt at hava eina ávísa eginfígging soleiðis, at ikki øll íløgan skal fíggast við lántøku. SEV

**Talva 2. Oljunýtsla í tonsum 2012-2018**

| 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | 2018 Ætlað | Frávik millum ætlan og roknskap 2018 | Frávik millum roknskapin fyri 2017 og 2018 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 36.746 | 36.893 | 30.880 | 25.738 | 32.195 | 32.631 | 35.976 | 35.804 | 172 | 3.345 |

*Mynd 8. Gongdin í dollarkursinum 2004 - 2018.*




hevur mett, at ein eginfígging uppá 25% er nøktandi, og hevur í roknskapunum fyri 2016, 2017 og 2018 tikið hædd fyri hesum kravinum í roknskapinum fyri framleiðslupartin og netpartin. Í sambandi við, at íløgurnar stavandi frá visión 2030 verður gjørdar fyrri enn áður ætlað, verður helst neyðugt at hækka kravið uppá 25% eginfígging til komandi fíggjarætlan.

Kravið til støddina av eginfíggingini tekur støði í íløgunum á fíggjarætlanini fyri framleiðslupartin og netpartin.

Frameftir verður markið ásett til 25% í eginfígging. Markið skal síggjast í mun til íløgurnar á fíggjarætlanini fyri eitt rullandi 5 ára tíðarskeið. Í fíggjarætlanini fyri 2019 sæst, at íløgurnar fyri 2018-2022 í framleiðslupartinum eru 1.420 mió. kr. Hetta svarar til 284 mió. kr. árliga í miðal. Eginfíggingarparturin fyri 2019 er soleiðis ætlaður til 71 mió. kr.

Fyri netpartin er talan um íløgur fyri 797 mió. kr., og er eginfíggingarparturin samsvarandi ætlaður til 40 mió. kr fyri 2019. Tað er umráðandi, at eginfíggingin er á einum nøktandi støði, og hetta kann bert gerast við avlopi á rakstrinum.

Eginfíggingin fyri inniverandi ár verður roknað soleiðis: peningastreymurin frá rakstri minus kostnað til rentur og avdrátt sett í mun til kravið uppá 25% fyri eginfígging av árligu miðalíløgum næstu 5 árini.

Fyri netpartin merkir hetta, at ársúrslitið verður tillagað soleiðis, at yvirskotið er svarandi til tær útreiðslur netparturin hevur umframt eina eginfígging uppá 25% av árligu miðalíløgunum næstu 5 árini fyri netpartin.

Býtið av yvirskotinum millum framleiðslupartin og netpartin árini framanundan hevur tikið støði í, at tilluta framleiðslupartinum eitt úrslit svarandi til at allur kostnaður er rindaður, íroknað kostnað fyri netumsitingina og netábyrgdina. Harumframt 4-5% vinning av primoeginpeninginum.

Frameftir verður neyðugt at økja inntøkurnar hjá framleiðslupartinum í mun til netpartin soleiðis, at hesar samsvara við øktu skuldarbyrðuna hjá framleiðslupartinum, sum væntandi kemur av útbyggingum av framleiðsluverkum.

Um samlaða úrslitið fyri samtakið var størri, var hesin parturin av úrslitinum fluttur til netpartin. Hetta er broytt í 2016 við, at tað nú er netparturin, sum hevur eitt tillagað úrslit og ikki framleiðsluparturin.

Samlaðu inntøkurnar fyri framleiðslupartin í 2018 vóru 259,1 mió. kr. móti 279,1 mió. kr. í 2017. Av hesum inntøkunum framleiddi Sundsverkið fyri 132,3 mió. kr. ella 51,1% og Vágsverkið fyri 34,8 mió. kr. ella 13,4%.

Hetta svarar til, at tey bæði størstu oljuriknu framleiðsluverkini framleiða fyri eina inntøku upp á 167,1 mió. kr. í 2018 svarandi til 64,5% mótvegis 185,1 mió. kr. ella 66,3% í 2017. Talan er um eina hægri framleiðslu við termiskari orku í 2018 í mun til 2017.

*Mynd 9: Oljuprísur í dollar pr. tons tungolju 2002 - 2018.*




Rakstrarúrslitið fyri framleiðslupartin í 2018 gav eitt yvirskot upp á 10,7 mió. kr. móti 57,8 mió. kr. í 2017, tá hædd verður tikin fyri kravinum um eginfígging.

Um hugt verður eftir úrslitinum áðrenn rentukostnað sæst, at samlaða úrslitið var 20,3 mió. kr. Rentukostnaðurin upp á 9,3 mió. kr. hjá framleiðslupartinum stavar frá lántøku til byggingina av Eiðisverkinum og vindmyllunum í Húsahaga eins og víðkanina av Sundsverkinum.

## Útreiðslur

Samlaðu útreiðslurnar í 2018 vóru 248,4 mió. kr., meðan samlaðu útreiðslurnar fyri 2017 vóru 221,3 mió. kr. svarandi til, at útreiðslurnar hækkaðu við 27,1 mió. kr. Talan er um útreiðslur til olju, rakstrarútreiðslur, avskrivingar, fíggjarkostnað og skatt. Fyri nærri sundurgreining av gongdini fyri árið í mun til ætlan og framroknað verður víst til samtaksroknskapin, sum sæst á www.sev.fo.

Rakstrarútreiðslurnar verða vanliga býttar í lønir til starvsfólk, tilfar og tænastuveitingar. Fyri framleiðsluverkini eru oljuútreiðslurnar ein sera stórur partur av samlaðu útreiðslunum.

## Oljuútreiðslur

Við støði í tí strategi, felagið hevur at halda løgdu fíggjarætlanina, hevur felagið prístryggjað (hedgað) tungoljukeypið fyri 2018 svarandi til lægri kostnað enn ætlað í fíggjarætlanini. Ein nærri lýsing av langtíðarætlanini fyri at avdekka váða er í samtaksroknskapinum, sum sæst á www.sev.fo.

Oljuútreiðslurnar vóru 105,5 mió. kr. í 2018 móti 84,5 mió. kr. í 2017 svarandi til ein hægri kostna á 21,0 mió. kr. Útreiðslurnar til tilfar, tænastuveitingar og lønir í 2018 vóru 59,1 mió. kr. mótvegis 58,9 mió. kr. í 2017 soleiðis, at hesar í 2018 vóru 0,2 mió. kr. hægri svarandi til 0,2%.

Talva 2 vísir oljunýtsluna í tonsum 2012-2018.

Samlaða framleiðslan í 2018 er, sum frammanfyri nevnt, økt við 17,7 GWt, og framleiðslan á oljuriknu verkunum er vaksin við 16,7 GWt svarandi til 10,2%, frá 163,4 GWt í 2017 til 180,1 GWt í 2018. Elframleiðslan úr vatni er fallin við 3,2 GWt úr 111,2 GWt niður í 108,1 GWt, ella 2,8%. Elframleiðslan úr vindi er vaksin við 4,1 GWt úr 59,7 GWt upp í 63,8 GWt, ella 6,9%.

Oljuprísirnir, sum SEV skal gjalda, eru tengdir at prísnoteringini á oljumarknaðinum og USD-kursinum. Miðalprísurin fyri 2014 var 554,1 dollar, fyri 2015 var hesin 260,7 dollar pr. tons tungolju og fyri 2016 var miðalprísurin pr. tons tungolju 216,8 dollar. Í 2017 var miðalprísurin pr. tons tungolju 310,2 dollar og í 2018 gjørdist hesin 398,1 dollar pr. tons tungolju.

Út frá hesum kann sigast, at oljuprísurin fyri tungoljuna er fallin frá 2014 til 2016, fyri síðani at hækka aftur fram til 2018.

Mynd 8 omanfyri vísir gongdina í dollarakursinum frá 2004 til 2018.

Dollarkursurin hevur sveiggjað nógv seinastu 5 árini. Við ársbyrjan 2016 var dollarkursurin 6,83 kr. pr. dollar, hesin lækkaði fram til

*Mynd 10: Oljunýtslan í tonsum 1990 – 2018*




mai, tá kursurin var 6,43 kr. pr. dollar. Síðani hækkaði hesin fram til amerikanska valið hin 8. november, tá kursurin var 6,74 kr. pr. dollar. Kursurin helt áfram at hækka, og var hesin 7,05 kr. pr. dollar við árslok 2016. Samanlagt er dollarin styrktur í 2016. Við ársbyrjan 2017 náddi dollarakursurin eini hædd, sum hann ikki hevur nátt síðani. Um ársskiftið 2016/17 var hann – tá hann var hægstur – 7,17 kr. pr. dollar. Síðani lá kursurin um 7 kr. pr. dollara ella beint niðanfyri tann fyrsta ársfjórðingin av 2017 fyri síðani frá 2. ársfjórðingi og fram til ultimo juli at falla niður á uml. 6,30 kr. pr. dollara. Har lá hann so árið út og við ársenda lá hann á 6,20 kr. pr. dollara. Gongdin í 2018 fyri dollaran er uppgangandi og á hálvárinum í 2018 var kursurin 6,39 kr. pr. dollara og við ársenda var hesin 6,52 kr. pr. dollara.

Gongdin í dollarinum fyri 2018 er avmyndað í mynd 11.

Sum nevnt vóru oljuútreiðslurnar 105,5 mió. kr. í 2018 móti 84,5 mió. kr. í 2017 svarandi til ein meirkostnað uppá 21,0 mió. kr., harav tungoljan er 85,8 mió. kr. Kostnaðurin fyri oljuna umfatar eisini smyrjiolju, gassolju, tungolju og urea, men kostnaðurin fyri tungoljuna er tann størsti.

At oljukostnaðurin í 2018 er hækkaður í mun til 2017 kemur av einum hækkandi oljuprísi og í nakað minni muni av eini heldur størri nýtslu av olju. Príshækkanin í 2018 stendur fyri 8,9 mió. kr. av samlaða meirkostnaðinum á 21,0 mió kr. á tungoljuni, meðan økta nýtslan á 3.345 tons í mun til 2017 er 8,0 mió. kr. Sambært roknskaparreglunum skulu goymslur virðismetast til marknaðarvirði, og hevur henda javning viðført ein kostnað á 4,1 mió. kr. í 2018, tí at marknaðarprísurin broytist.

Miðalnýtslukostnaðurin fyri hvørt tons tungolju var 2.384 kr. í 2018 móti 2.123 kr. pr tons í 2017. Talan er sostatt um ein meirkostnað í 2018 upp á 261 kr. pr. tons í mun til 2017.

Miðalnýtslukostnaðurin fyri hvønn litur gassolju var í 2018 5,61kr. móti 4,93 kr. í 2017. Hann var sostatt 0,68 kr. hægri enn í 2017.

Nógv tann størsti parturin av oljuútreiðslunum upp á 105,5 mió. kr. stavaðu frá Sundsverkinum og Vágsverkinum við ávikavist 84,2 mió. kr. og 14,3 mió. kr. ella 93,3% av samlaðu oljunýtsluni. 84,0% av oljuútreiðslunum stava einsamalt frá Sundsverkinum

Mynd 9 vísir gongdina í oljuprísinum síðani 2001 og fram til ultimo 2018.

Myndin vísir, at prísurin hækkaði javnt frá 2001 til á heysti 2006, men fall aftur við byrjanini av 2007, tá ið prísurin var umleið 220 dollar pr. tons tungolju. Síðani hækkaði prísurin sera nógv, og hevði ongantíð áður verið so høgur sum á heysti 2008. Hesin var væl yvir 700 dollar pr. tons tungolju. Síðani kom fíggjarkreppan, og oljuprísurin fall sera nógv svarandi til sama støði sum við byrjanini av 2007 svarandi til umleið 220 dollar pr. tons tungolju.

Síðani hækkaði oljuprísurin aftur, og við endan av 2013 var hann 608 dollar pr. tons tungolju, sum er á einum sera høgum støði. Oljuprísurin fall í januar 2014 til 584 dollar pr. tons tungolju , men

*Mynd 11: DKK/Dollar 2018*




hækkaði aftur til 633 dollar í juni mánað, tá stóra prísfallið til 321 dollar pr. tons tungolju í desember 2014 byrjaði. Miðalprísurin fyri januar 2015 var 244 dollar pr. tons tungolju, og oljuprísurin hækkaði fram til mai 2015 upp til 340 dollar pr. tons tungolju. Síðani fall oljuprísurin aftur í desember 2015 og var 154 dollar pr. tons tungolju. Miðalprísurin fyri 2015 var 261 dollar pr. tons tungolju.

Í januar 2016 var miðalprísurin 122,9 dollar pr. tons tungolju, og hækkaði hesin framhaldandi gjøgnum árið fram til oktober, har hesin var 281,4 dollar í miðal pr. tons tungolju. Síðani fall hesin til 255,5 dollar í miðal fyri november fyri aftur at hækka til 302,5 dollar í miðal pr. tons tungolju í desember 2016. Miðalprísurin pr. tons tungolju fyri 2016 var 216,8 dollar.

Í 2017 var gongdin heldur svingandi. Lægsti miðalprísur var í juni, tá prísruin var 280,3 dollar, meðan hægsti prísur var í november, tá hann lá á 352,2 dollar. Miðalpísurin pr. tons tungolju fyri 2017 var 310,5 dollarar.

Í 2018 hevur gongdin í oljuprísinum verið bæði lækkandi og hækkandi. Prísurin lækkaði frá januar fram til mars, fyri síðani at hækka fram til oktober mánað. Frá oktober og fram til desember mánaða hevur oljuprísurin verið lækkandi. Lægsti miðalprísur var í desember, tá prísurin var 337,0 dollarar, meðan hægsti prísurin var í oktober, tá hann lá á 465,4 dollarar. Miðalprísurin pr. tons tungolju fyri 2018 var 398,1 dollarar.

Oljuútreiðslurnar svara til 42,5% av kostnaðinum og avskrivingunum fyri 2018 hjá framleiðslupartinum. Tí hevur tað stóra ávirkan á rakstrarúrslitið, hvussu gongdin í oljuprísinum og kursurin á dollaranum er.

Mynd 10 vísir eitt yvirlit yvir oljunýtsluna í sambandi við framleiðsluna av el frá 1989–2018 býtt út á gassolju, tungolju og samlað.

Millum annað sæst, at samlaða nøgdin av gassolju er 4,1% í 2018 móti 4,2% í 2017. Myndin vísir eisini, at tann samlaða nøgdin av olju í 2018 er hægri enn í 2017. Hetta hongur eisini saman við teimum talvum, vit hava sæð frammanundan, sum vísa, at elframleiðslan við termiskari orku hevur verið hægri í 2018 enn í 2017.

## Tilfar og tænastuveitingar

Útreiðslur til tilfar og tænastuveitingar til framleiðsluvirkir í 2018 vóru 22,4 mió. kr. móti 25,0 mió. kr. í 2017 svarandi til eina lægri nýtslu upp á 2,7 mió. kr. Fyri fleiri sundurgreiningar av kostnaðinum fyri seinastu árini verður víst til samtaksroknskapin hjá felagnum, sum sæst á www.sev.fo.

Felagið hevur í 2012 broytt hugburð viðvíkjandi innrokning av størri viðlíkahaldsarbeiðum, sum eru við til at leingja livitíðina hjá framleiðslueindunum. Fram til 2012 hevur felagið avskrivað hesar útreiðslur í einum yvir raksturin tað árið, sum arbeiðið bleiv gjørt. Mett er av nýggjum um hendan framferðarhátt. Útreiðslur, sum stuðla livitíðsleingingina av framleiðslueindunum og hartil hoyrandi rakstrargøgnum, verða nú avskrivaðar yvir livitíðsleingingina.

Kostnaðurin til tilfar og tænastuveitingar á Sundsverkinum í 2018 er 9,5 mió. kr. móti 9,8 mió. kr. í 2017 ella 42,4% av samlaða

kostnaðinum fyri tilfar og tænastuveitingar í 2018. Hetta lutfall var fyri Sundsverkið 39,2% í 2017. Talan er annars um eina lækking upp á 0,3 mió. kr. ella 3,0% fyri kostnaðin á Sundsverkinum. Av samlaða kostnaðinum eigur Vágsverkið 2,1 mió. kr. í 2018 móti 3,0 mió. kr. í 2017. Talan er um eina lækking upp á 0,9 mió. kr. ella 30,0% av kostnaðinum fyri Vágsverkið.

## Kostnaður fyri netábyrgd

Í samlaðu útreiðslunum hjá verkunum er íroknað kostnaðurin av at framleiða elmegi og kostnaðurin fyri netábyrgdina.

Kostnaðurin tilsamans kann sundurgreinast í kostnaðin fyri stýring av elnetinum, kostnaðinum fyri veitingartrygd, rullandi mátti, tøka máttinum og kostnaðinum fyri netábyrgd annars. Framleiðsluverkini selja sína framleiðslu av elmegi til netvirksemið, sum rindar fyri keypið umframt kostnaðinum fyri tí partinum av netábyrgdini, sum verkini standa fyri.

## Kostnaður fyri stýring av elnetinum.

Stýringin av elnetinum í Suðuroy fer fram á framleiðsluverkinum í Vági, meðan stýringin av elnetinum í meginøkinum fer fram á Fossáverkinum í Vestmanna.

Kostnaðurin fyri stýringina av elnetinum á Fossáverkinum upp á 2,3 mió. kr. er uppgjørdur sum samlaður kostnaður fyri lønir á Fossáverkinum eitt vanligt rakstrarár upp á 3,0 mió. kr., frádrigið kostnaðinum fyri lønir til vanligan rakstur av verkinum upp á 0,7 mió. kr. Kostnaðurin fyri vanligan rakstur á verkinum er settur til at verða tann sami, sum tað kostar at reka Mýru- og Heygaverkið tilsamans, svarandi til 0,7 mió. kr. eitt vanligt rakstrarár. Sami kostnaður fyri stýringina av elnetinum á Fossáverkinum er brúktur til kostnaðin fyri stýringina av elnetinum í Suðuroy svarandi til 2,3 mió. kr

## Kostnaður fyri veitingartrygd, rullandi mátt og tøkan mátt

Kostnaðurin fyri veitingartrygdina, rullandi máttin og tøka máttin er mettur til at verða 5% av samlaða rakstrarkostnaðinum, íroknað partar av avskrivingum av Sunds- og Vágsverkinum, svarandi til ávikavist 5,6 mió. kr. og 3,9 mió. kr. Talan er um eina ásetta meting av kostnaðinum.

Kostnaðurin fyri netábyrgdina annars er grundaður á kostnaðin hjá felagnum av smáverkum kring landið, sum verða mett sum eyka verk ella tøkur máttur. Smáverkini fáa rakstrarkostnaðin fyri løn og tilfar endurgoldnan fyri veitingartrygd, restin av kostnaðinum verður endurgoldin sum keyp av framleiðslu til víðarisølu. Elverkið á Strond fær rakstrarkostnaðin fyri løn og tilfar fyri termiska framleiðslu av elmegi umfataða sum veitingartrygd. Restin av kostnaðinum verður endurgoldin sum keyp av framleiðslu til víðarisølu.

## Kostnaður fyri netábyrgd samanumtikið

Samlaður kostnaður fyri stýring av elnetinum í Føroyum er 4,6 mió. kr., meðan kostnaðurin fyri veitingartrygdina, rullandi máttin og tøka máttin á Sundsverkinum og Vágsverkinum er settur til 9,5 mió. kr. Kostnaðurin fyri veitingartrygdina v.m. frá øðrum verkum er 7,3 mió. kr. svarandi til, at samlaður kostnaður fyri veitingartrygd, tøkan rullandi eykamátt og stýring av elnetinum er mettur til 16,8 mió. kr.

## Lønarútreiðslur

Lønarútreiðslurnar til framleiðsluvirksemið vóru 36,7 mió. kr. í 2018 móti 33,9 mió. kr. í 2017 svarandi til ein hækkan á 2,8 mió. kr.

Av samlaða lønarkostnaðinum í 2018 upp á 36,7 mió. kr. eigur Sundsverkið 18,9 mió. kr. ella 51,5%, sum er 1,7 mió. kr. hægri enn í 2017. Vágsverkið eigur 5,7 mió. kr. í lønarkostnaði svarandi til 15,5%, sum er 0,2 mió. kr. hægri enn í 2017. Lønarútreiðslurnar til Fossáverkið vóru 4,9 mió. kr. í 2018 svarandi til 13,3% móti 4,7 mió. kr. í 2017 svarandi til 13,9%. At lønarútreiðslurnar til Fossáverkið og Vágsverkið eru á einum hægri støði enn framleiðslan tilskilar, er grundað á stýringina av elnetinum í meginøkinum og í Suðuroy. Hendan kostnað fáa framleiðsluverkini endurrindaðan frá netpartinum, sum framman fyri greitt frá.

Samanumtikið kann sigast, at størsti parturin av lønarútreiðslunum fara til oljuriknu verkini. Vatn- og vindorkuverkini hava bert 10,5 mió. kr. ella 28,6% av samlaða lønarkostnaðinum upp á 36,7 mió. kr., har ein partur av lønarkostnaðinum er kostnaður til stýring av elnetinum..

## Fíggjarkostnaður

Rentuútreiðslurnar vóru 9,3 mió. kr. í 2018 móti 9,5 mió kr. í 2017. ella 0,2 mió kr. minni. Hetta er náttúrliga gongdin og eisini tí at ongin umskipan av samlaðu skuldini er farin fram, sum hendi í 2016, tá felagið umskipaði samlaðu skuldina í sambandi við íløgur.

Sí nærri frágreiðing um endurfíggingina og nýggju fíggingina í samtaksroknskapinum fyri 2016 á www.sev.fo.

## Avskrivingar

Avskrivingarnar fyri 2018 vóru 74,2 mió. kr. móti 67,8 mió. kr. í 2017, sum er 6,4 mió. kr. hægri.

Sundsverkið hevur í 2018 avskrivað upp á ognir fyri 23,3 mió. kr. móti 19,4 mió. kr. í 2017 og Eiðisverkið fyri 19,8 mió. kr. móti 19,6 mió. kr. í 2017 svarandi til, at hesi bæði framleiðsluverkini hava avskrivað upp á ognir í 2018 fyri 43,1 mió. kr. móti 39,0 mió. kr. í 2017. Avskrivingin í 2018 fyri hesi bæði verkini upp á 43,1 mió. kr. svarar til 58,1% av tilsamans 74,2 mió. kr.

| Marknaðarváði | Kreditt- og mótpartsváði | Rakstrarligir váðar | Strategiskir og aðrir váðar |
|---|---|---|---|
| Rentuváði | Áogn hjá kundum | Veitingartrygd | Teir strategisku váðarnir eru meira yvirskipa tengdir at, hvussu felagið skipar sítt virksemi, politisk viðurskifti, umdømi o.s.fr. |
| Oljuprísváði | Innistandandi hjá bankum | Kunningartøkni (KT) | |
| Gjaldoyraváði | Lánsbrøv | Feilir í innanhýsis mannagongdum | |
| Gjaldførisváði | Tryggingar | Feilir av mannaávum | Nýggj tøkni (disruption) |
| | | Heilsa, trygd og umhvørvi | Verkætlanir |
| | | | Vitanarstøði og menning |

Vágsverkið verður avskrivað við 8,5 mió. kr., vindmyllurnar í Húsahaga við 7,3 mió. kr. fyri 2018, vindmyllurnar í Neshaga verða avskrivaðar við 3,1 mió. kr., og vatnverkini í Vestmanna verða avskrivað við 8,2 mió. kr.

Gjørdar verða metingar, tá ið fíggjarætlanin verður gjørd fyri komandi ár, hvørjar íløgur væntandi verða lidnar í árinum og harvið tiknar í nýtslu, og byrjað verður at avskriva upp á ognina. Munurin millum staðfestu og ætlaðu avskrivingarnar hevur støði í hesum metingum og veruligum staðfestingum, eins og íløgurnar vóru nakað lægri enn ætlað.

## Váðaviðurskifti

Nærri lýsing av váðaviðurskiftunum er í samtaksroknskapinum, sum sæst á www.sev.fo.

## Íløgur

Íløgurnar í materiellari støðisogn vóru 282,2 mió.kr. í 2018 móti 268,5 mió. kr. í 2017, sum talva 3 vísir.

Í 2018 er tað serliga útbyggingin av Sundsverkinum, Støð 3 og dagtangahúsið knýtt at Sundsverkinum, sum merkja íløgutølini. Íløgan í víðkan av Sundsverkinum, Støð 3 er 226,5 mió.kr. Arbeiðið

| Talva 3. Íløgur í mió kr. | Upprunaætlan 2018 fyri íløgur | Umraðfesting av íløgum 2018 | Ætlan eftir umraðfesting | Íløgur sambært roknskap 2018 | Frávik í mun til roknskap og javnað ætlan |
|---|---|---|---|---|---|
| | 1 | 2 | 3=1+2 | 4 | 5=4-3 |
| Fossáverkið | 2,6 | 0,0 | 2,6 | 0,4 | -2,2 |
| Heygaverkið | 0,8 | 0,0 | 0,8 | 0,1 | -0,7 |
| Mýruverkið | 4,5 | 0,0 | 4,5 | 1,8 | -2,6 |
| Eiðisverkið | 6,1 | 0,3 | 6,3 | 2,6 | -3,7 |
| Verkið í Botni | 9,4 | 0,0 | 9,4 | 4,7 | -4,7 |
| Vágsverkið | 7,5 | 0,0 | 7,5 | 6,7 | -0,8 |
| Sundsverkið | 325,1 | 0,5 | 325,6 | 255,3 | -70,3 |
| Verkið á Strond | 9,1 | 0,0 | 9,1 | 5,4 | -3,7 |
| Smærri verk | 8,3 | 0,3 | 8,6 | 2,9 | -6,3 |
| Vindmyllur í Meginøkinum | 10,0 | -0,1 | 9,9 | 0 | -9,4 |
| Vindmyllur á Eiði | 0,0 | 0,1 | 0,1 | 0 | 0,0 |
| Vindmyllur í Suðuroy | 5,0 | 0,0 | 5,0 | 2,2 | -2,8 |
| **Íløgur í framleiðsluvirkir tilsamans** | **388,3** | **1,1** | **389,4** | **282,2** | **-107,2** |

| Talva 4. Íløgur tilsamans í mió. kr. | 2018 | 2017 |
|---|---|---|
| Íløgur bókaðar til arbeiði í gerð | 277,3 | 262,2 |
| Beinleiðis bókaðar íløgur sum tilgongd | 4,9 | 5,5 |
| Íløgur við ársenda | **282,2** | **267,8** |

við Støð 3 á Sundsverkinum gongur sum ætlað. Nýggju motorarnir komu til landið á sumri 2018, og royndarkoyringin verður gjørd seinra hálvár 2019. Ætlandi verður nýggja Støð 3 handað SEV fyrst í 2020. Samlaða íløgan í verkið er ætlað til 730 mió. kr., har 680 mió. kr. er til verkið, meðan 60 mió. kr. er til nýggja koplingarstøð knýtt at verkinum.

Nýggjur tangagarður og nýtt dagtangahús hevur verið í gerð síðani 2012. Verkætlanin er nú liðug og húsið bleiv formliga tikið í nýtslu 8. november 2018. Í 2018 eru íløgur fyri 25,0 mió. kr. gjørdar í verkætlanina. Samlaði kostnaðurin fyri tangagarðin, bygningin, tangar, teknisk útgerð og elarbeiðið er uppgjørdur til 143,4 mió. kr. sum er 6,0 mió.kr. hægri enn ætlað. SEV metur seg hava fingið væl burturúr verkætlanini og meirkostnaðinum.

Íløgan í nýggja tangagarðin styrkir munandi um umhvørvistrygdina hjá SEV, har tangagarðurin er førur fyri at hýsa 10.000 rúmmetrum, svarandi til at nøgdin í størsta goymslutanganum á 8.000 rúmmetur rúmast í tangagarðinum, um eitt óhapp skuldi hent.

Í dagtangahúsinum eru øll oljuviðgerð savnað, herundir brenniolja, smyrjiolja og spillolja. Umframt oljuviðgerð er eisini Urea savnað her, sum er ein partur av roykreinsiskipanini til nýggju motorarnar á Støð 3.

Á Vágsverknum eru gjørdar samlaðar íløgur fyri 6,7 mió. kr., har serliga arbeitt hevur verið við nýggja scada skipan og størra goymslutanganum. Vegurin niðan á Mýrarnar er asfalteraður og samlaðar íløgur í Mýruverkið er 1,8 mió. kr. Á Eiðisverkinum eru íløgur framdar fyri 2,6 mió.kr., har vegurin tiil sunnaru byrgingina er asfalteraður.

| Talva 5. Arbeiði í gerð í mió kr. | 2018 | 2017 |
|---|---|---|
| Saldo við ársbyrjan | 363,0 | 159,4 |
| Íløgur bókaðar til arbeiði í gerð | 277,3 | 262,2 |
| Arbeiðir førd til avskrivingar sum tilgongd | -126,2 | -58,6 |
| Saldo við ársenda | 514,2 | 363,0 |
| Broyting í arbeiði í gerð | **151,2** | **203,6** |

| Talva 6. Tilgongd til støðisogn í mió. kr. | 2018 | 2017 |
|---|---|---|
| Arbeiðir førd til avskrivingar sum tilgongd | 126,2 | 58,6 |
| Beinleiðis bókaðar íløgur sum tilgongd til støðisogn | 4,9 | 5,7 |
| Tilgongd við ársenda | **131,0** | **64,3** |

Á elverkinum Á Strond er vatnturbinan uppstigin fyri 2,7 mió. kr. eins og arbeitt hevur verið uppá at gera dagføringina av bygninginum lidna. Samlaðar íløgur í verkið Á Strond eru 5,4 mió. kr.

Tilgongd frá arbeiði í gerð og beinleiðis bókað til støðisogn (avskrivingargrundarlag) var 131,0 mió. kr. í 2018 og 64,3 mió. kr. í 2017. Víst verður eisini til arbeiði í gerð og til notu 7 í roknskapinum.

Víst verður annars til nærri umrøðu um íløgurnar í samtaksrokn-skapinum, sum sæst á www.sev.fo.

## Gjaldførið

Gjaldførið er ikki skilt sundur millum framleiðslu og net, og hava millumrokningar millum partarnar verið nýttar. Í hesum roknskapi er gjaldførið hjá framleiðsluverkunum ásett til 0 mió. kr., men alt virksemið hjá verkunum verður fíggjað av netpartinum, sum tryggjar verkunum neyðugt gjaldføri. Sama er galdandi fyri vindfeløgini, sum eisini verða fíggjað av netpartinum.

Gjaldføri felagsins við ársenda 2018 er 190,8 mió. kr. móti 248,0 mió. kr. í 2017. Harumframt koma óbrúktir trekningsrættir og kassakredittir í peningastovnum upp á tilsamans 314,9 mió. kr.

Sostatt er tøki peningurin, kredittir og óbrúktir trekningsrættir 505,7 mió. kr. í 2018 móti 768,0 mió. kr. í 2017. Størsti parturin av óbrúktu trekningsrættunum skal brúkast til at fíggja íløgur komandi árini. Neyðugt er at hava eitt trygt gjaldføri til dagliga raksturin av felagnum, eins og tað verður mett skilagott at hava eitt munagott gjaldføri við atliti at ótryggleikanum á fíggjarmarknaðunum kring heimin.

Endamálið er at hava eitt munagott gjaldføri soleiðis, at SEV altíð er ført fyri at rinda kontant fyri eitt oljukeyp og kostnaðin av einum óhappi á einum av framleiðsluverkunum ella av netinum. Harumframt er neyðugt at hava eitt trygt gjaldføri til dagliga raksturin hjá framleiðsluverkunum og á netpartinum. Nærri lýsing av gjaldførinum er í samtaksroknskapinum, sum sæst á www. sev.fo.

## Útlit fyri rakstrarárið 2019

Úrslitið áðrenn skatt fyri 2019 er eitt ætlað yvirskot upp á umleið 39,0 mió. kr. við støði í fyriliggjandi ætlan fyri 2019. Væntandi verður yvirskotið hægri grundað á tillagan av yvirskotinum í netpartinum í mun til háttin at býta yvirskotið millum partarnar í mun til at lúka kravið um eginfígging uppá 25%. Væntandi verður úrslitið nøktandi, eins og úrslitið frameftir má geva eitt nøktandi avlop.

Rakstrarútreiðslurnar verða mettar at verða 54,4 mió. kr. í 2019 móti 59,1 mió. kr. í 2018 svarandi til eina lægri útreiðslu upp á 4,7 mió. kr.

Oljuútreiðslurnar eru í fíggjarætlanini fyri 2019 mettar at verða 116,1 mió. kr. móti 105,5 mió. kr. í 2018, sum eru 10,6 mió. kr. hægri. Felagið hevur sum eina langtíðarætlan at prístryggja oljukeypið fyri árið í mesta lagi á hædd við tað sama sum í fíggjarætlanini.

Felagið hevur prístryggjað oljukeypið fyri árið 2019 í við avtalum í 2016, 2017 og 2018. Væntandi verður oljukostnaðurin fyri 2019 nakað lægri enn roknað við í fíggjarætlanini grundað á at prísstøðið av prístryggingaravtalunum gjørdist nakað lægri enn ætlað í fíggjarætlanini. Harumframt skal hædd takast fyri javnan av oljugoymslum til marknaðarvirði.

Avskrivingarnar verða 72,3 mió. kr. í 2019 móti 74,2 mió. kr. í 2018. Rentuútreiðslurnar væntast at vaksa við økingini í skuldini, sum í stóran mun fer til at fíggja íløgurnar í Sundsverkið, koplingarstøðir og býtisvirkir. Rentuútreiðslurnar væntast at verða hægri í 2019 enn rentuútreiðslurnar í 2018, sum vóru 9,3 mió. kr. Orsøkin er økt lántøka til íløgurnar innan framleiðslupartin.

Við einum mettum yvirskoti í 2019 sum er nøktandi, luttekur raksturin fyri framleiðslupartin við einari nøktandi eginfígging til íløgur. Tað er neyðugt at hava eina nøktandi eginfígging frá rakstrinum, sum skal vera við til at fíggja komandi íløgur í verandi framleiðsluverk og íløgur í varandi orkukeldur.

Nærri lýsing av 2018 sæst í Rakstrar-, fíggjar- og íløguætlan felagsins fyri 2019 á www.sev.fo.

# Nýttur roknskaparháttur

## ALMENT

Ársroknskapurin fyri Elfelagið SEV er gjørdur í samsvari við ásetingarnar í ársroknskaparlógini fyri stór feløg í flokki C.

Framleiðsluroknskapurin er gjørdur upp sum ein samtaksroknskapur, uttan útjavnan av innanhýsis bókingum í rakstri og javna. Hetta fyri at geva lesaranum so góða kunning sum gjørligt um alt framleiðsluvirksemi hjá SEV-samtakinum. Annars er ársroknskapurin gjørdur eftir sama roknskaparhátti sum undanfarna ár og verður gjørdur í donskum krónum.

Upphæddir í rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum v.m. verða avrundaðar til heil tøl, og samanberingartøl undanfarna ár verða avrundað til heil túsund. Av tí at tølini verða avrundað hvørt fyri seg, kunnu avrundingarmunir vera millum upplýstar samanteljingar og summin av teimum undirliggjandi tølunum.

Har sum talvur í roknskapinum vísa tøl avrundaði til heilar túsund ella millión krónur, og talvan inniheldur samanburðartøl millum ár víst sum munur í krónum ella prosentum, eru samanburðartølini roknaði upp á undirliggjandi tølini og síðani avrundað. Tískil kann koma fyri, at smærri munir eru millum avrundaðu tølini, sum víst verða í talvuni, og útroknaði samanburðartølini í talvuni.

### Alment um innrokning og virðisáseting

Í rakstrarroknskapinum verða inntøkur innroknaðar, so hvørt tær verða vunnar. Sama er galdandi fyri virðisjavningar av fíggjarligum ognum og skyldum. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis allir kostnaðir innroknaðir, herímillum avskrivingar, niðurskrivingar, avsettar skyldur og afturføringar, sum standast av broyttum roknskaparligum metingum av upphæddum, ið áður hava verið innroknaðar í rakstrarroknskapinum.

Ognir verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini geva felagnum fíggjarligar fyrimunir, og virðið av ognini kann ásetast álítandi.

Skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini taka fíggjarligar fyrimunir úr felagnum, og virðið av skylduni kann ásetast álítandi.

Við innrokning og virðisáseting verður atlit tikið at væntaðum tapi og váða, ið vísa seg, áðrenn ársfrásøgnin er liðug, og sum viðvíkja viðurskiftum, sum vóru til staðar við roknskaparlok.

### Umrokning av fremmandum gjaldoyra

Handlar í fremmandum gjaldoyra verða umroknaðir til kursin, sum er galdandi á handilsdegnum. Gjaldoyrakursmunir millum handilsdagin og gjaldsdagin verða innroknaðir í rakstrarroknskapin sum ein fíggjarpostur.

Áogn, skuld og aðrir peningaligir postar í fremmandum gjaldoyra, sum ikki eru avroknaðir við roknskaparlok, verða umroknaðir til gjaldoyrakursin við roknskaparlok. Munurin millum gjaldoyrakursin við roknskaparlok og kursin, ið var galdandi á upptøkudegnum, verður innroknaður í rakstrarroknskapin undir fíggjarpostum.

## RAKSTRARROKNSKAPUR

### Nettosøla

Nettosøla verður innroknað í rakstrarroknskapin, um veiting og váði eru farin til keypara innan rokn-skaparlok, og inntøkan er álítandi uppgjørd og væntast at koma inn. Nettosølan verður innroknað uttan meirvirðisgjald, avgjøld og eftir at avsláttur í samband við søluna er frádrigin.

### Vørunýtsla

Vørunýtsla umfatar kostnaðir til keyp av ráværum og hjálpartilfari, frádrigið avsláttur og goymslubroyting í árinum.

### Aðrir uttanhýsis kostnaðir

Aðrir uttanhýsis kostnaðir umfata keyp av olju, tilfari og øðrum tænastuveitingum umframt annan fyrisitingarkostnað.

### Rakstrarbýti, framleiðsla og net

Inntøkur hjá framleiðsluverkum eru ásettar at samsvara við samlaða kostnaðin hjá elverkunum, umframt at ein vinningur av framleiðsluni av primo egingognini er innroknaður. Roknaði vinningurin er ásettur við støði í avkasti av langfreistaðum realkreditlánsbrøvum og virðisrøkt av ognum hjá framleiðslupartinum.

Samlaði kostnaðurin hjá elverkunum kemur av kostnaðinum í sambandi við at framleiða elmegi umframt kostnaðin fyri netábyrgd. Hesin kann sundurgreinast í kostnaðin fyri stýring av elnetinum, kostnaðin fyri veitingartrygd, rullandi mátt, tøkan mátt og kostnaðin fyri netábyrgd annars.

Kostnaðurin fyri stýringina av elnetinum í meginøkinum er uppgjørdur sum samlaður kostnaður fyri lønir á Fossáverkinum, frádrigið kostnaðin fyri lønir til vanligan rakstur av verkinum. Kostnaðurin fyri stýringina av elnetinum í Suðuroy er tann sami sum fyri stýringina av elnetinum í meginøkinum.

Kostnaðurin fyri veitingartrygdina, rullandi máttin og tøka máttin er ein partur av samlaða rakstrarkostnaðinum, íroknað partar av avskrivingum hjá Sunds- og Vágsverkinum. Talan er um eina ásetta meting av kostnaðinum.

Kostnaðurin fyri netábyrgdina annars er grundaður á kostnaðin hjá smáverkum kring landið. Smáverkini fáa rakstrarkostnaðin fyri løn og tilfar endurgoldnan fyri veitingartrygd. Restin sum eginframleiðsla. Elverkið á Strond fær rakstrarkostnaðin fyri løn og tilfar fyri termiska framleiðslu av elmegi endurrindaðan sum veitingartrygd. Restin av kostnaðinum kemur frá eginframleiðslu.

Sambært elveitingarlógini skal netvirksemið fíggjarliga hvíla í sær sjálvum soleiðis, at inntøkurnar eru hóskandi til at gjalda fyri rakstur og ætlaðar neyðugar íløgur.

Fyri netpartin merkir hetta, at hesin skal hava eina inntøku svarandi til tær útreiðslur netparturin hevur soleiðis, at netparturin kann gjalda fyri raksturin umframt at netparturin skal hava inntøkur til at kunna rinda fyri ætlaðar neyðugar íløgur. Inntøkurnar fyri neyðugu íløgurnar taka støði í kravinum til eginfígging.

SEV hevur mett, at ein eginfígging uppá 25% er nøktandi, og hevur í roknskapinum tikið hædd fyri hesum kravinum í roknskapinum fyri framleiðslupartin og netpartin.

Kravið til støddina av eginfíggingini tekur støði í íløgunum á fíggjarætlanini fyri framleiðslupartin og netpartin fyri eitt 5 ára tíðarskeið, sum er inniverandi ár og næstu 4 árini. Eginfíggingin fyri inniverandi ár verður roknað soleiðis: peningastreymurin frá rakstur minus kostnað til rentur og avdrátt sett í mun til kravið uppá 25% fyri eginfígging av árligu miðalíløgum næstu 5 árini.

Fyri netpartin merkir hetta, at ársúrslitið verður tillagað soleiðis, at yvirskotið er svarandi til tær útreiðslur netparturin hevur umframt eina eginfígging uppá 25% av árligu miðalíløgunum næstu 5 árini fyri netpartin. Um samlaða úrslitið fyri samtakið er størri enn úrslitið fyri netpartin, verður hesin partur av úrslitinum fluttur til framleiðslupartin.

### Starvsfólkakostnaðir

Starvsfólkakostnaðir umfata løn íroknað frítíðarløn og eftirløn umframt onnur sosial gjøld. Í starvsfólkakostnaðum verða móttikin endurgjøld frá almennum myndugleikum trekt frá.

### Av og niðurskrivingar

Av- og niðurskrivingar umfata av- og niðurskrivingar í árinum av immateriellari og materiellari støðisogn.

### Fíggjarpostar

Fíggjarligir postar umfata rentuinntøkur og kostnaðir umframt staðfestan og óstaðfestan kursvinning og tap viðvíkjandi fíggjarligum ognum og skyldum. Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir verða innroknað í rakstrarroknskapin við teimum upphæddum, sum viðvíkja roknskaparárinum. Vinningsbýtið frá kapitalpørtum í assosieraðum feløgum verður inntøkuført í tí roknskaparári, sum vinningsbýtið verður samtykt.

Rentukostnaðir og aðrir kostnaðir av lánum til at fíggja framleiðslu av immateriellari og materiellari støðisogn, og sum viðvíkja framleiðslutíðarskeiðinum, verða ikki innroknaðir í útveganarvirðið av støðisognini.

## FÍGGJARSTØÐAN

### Materiell støðisogn

Materiell støðisogn verður virðisásett til útveganarvirði, frádrigið samlaðar avskrivingar og niðurskrivingar. Grundøki verða ikki avskrivað.

Avskrivingargrundarlagið umfatar útveganarvirðið við frádrátti av væntaðum restvirði eftir lokna brúkstíð.

Útveganarvirðið umfatar keypsprísin og kostnaðir, ið beinleiðis eru knýttir at útveganini, til ognin er klár at taka í nýtslu.

Avskrivað verður javnt yvir væntaðu brúkstíðirnar og restvirðunum hjá ognunum:

| | *Brúkstíð* | *Restvirði* |
|---|---|---|
| Framleiðsluvirkir | 10-50 ár | 0% |
| Bygningar | 50 ár | 0% |
| Rakstrargøgn | 3-5 ár | 0% |

Smáamboð við eini væntaðari livitíð á undir 1 ár verða útreiðsluførd í útveganarárinum.

Viðvíkjandi eginframleiddum ognum fevnir útveganarvirðið um kostnaðir av tilfari, lutum, undirveitarum, beinleiðis lønarkostnaði og óbeinleiðis framleiðslukostnaði.

### Niðurskriving av støðisogn

Hvørt ár verða roknskaparligu virðini á materiellari støðisogn mett fyri at fáa ábending um, hvørt tey eru minkað í virði. Hetta kemur afturat vanligu avskrivingini.

Eru ábendingar um virðisminking, verður ein niðurskrivingarroynd gjørd av hvørji einstakari ogn ella ognarbólki. Niðurskrivað verður til endurvinningarvirðið, um hetta er lægri enn roknskaparliga virðið. Endurvinningarvirðið er tað hægra av nettosøluprísinum og kapitalvirðinum. Kapitalvirðið verður uppgjørt sum nútíðarvirði av væntaðu nettoinntøkunum frá nýtsluni av ognunum.

## FÍGGJARLIG STØÐISOGN

### Kapitalpartar í assosieraðum feløgum

Kapitalpartar í assosieraðum feløgum verða virðisásettir til útveganarvirði. Er nettorealisatiónsvirðið lægri enn útveganarvirðið, verður niðurskrivað til lægra virðið.

### Vørugoymslur

Vørugoymslur verða virðisásettar til útveganarvirði eftir FIFO-háttinum. Um nettorealisatiónsvirðið av vørugoymslunum er lægri enn útveganarvirðið, verður niðurskrivað til lægra virðið.

Útveganarvirðið á handilsvørum umframt rávørum og øðrum hjálpartilfari umfatar keypsprís umframt flutningsgjald.

Útveganarvirðið av framleiddum liðugtvørum og vørum í gerð umfatar útveganarvirðið av rávørum, hjálpartilfari, beinleiðis lønarkostnaðum og óbeinleiðis framleiðslukostnaðum. Óbeinleiðis framleiðslu-kostnaðir umfata óbeinleiðis tilfar og løn umframt viðlíkahald og avskrivingar av maskinum, virkis-bygningum og útgerð, ið verður nýtt í framleiðsluni. Harumframt umfatar posturin kostnaðir til at leiða og fyrisita fram¬leiðsluna, umframt ognarførdan menningarkostnað, ið viðvíkur vøruni.

### Áogn

Áogn verður virðisásett til amortiserað útveganarvirði, sum vanliga svarar til áljóðandi virði. Fyri at standa ímóti møguligum tapi verður niðurskrivað til nettorealisatiónsvirðið.

### Partafelagsskattur og útsettur skattur

Skyldugur skattur og skattaáogn verða innroknað í fíggjarstøðuna við teirri upphædd, sum kann útroknast av skattskyldugu inntøkuni fyri árið, javnað fyri skatt frá undanfarnum árum. Skyldugur skattur og skattaáogn verða víst mótroknað í tann mun, at hetta er í samsvari við lógina, og at postarnir væntandi verða avroknaðir netto ella samstundis.

Útsettur skattur verður roknaður av øllum viðkomandi tíðarbundnum munum millum roknskaparlig og skattlig virðir av ognum og skyldum. Hetta verður uppgjørt við støði í ætlaðu nýtsluni av ognini, ella hvussu skyldan ætlandi verður afturgoldin.

Útsett skattaáogn, herímillum skattliga virðið á framflytingarheimilaðum skattligum hallum, verður innroknað við tí virði, sum ognin væntandi verður realiserað fyri, antin við at javna í skatti av framtíðarinntøkum ella við at mótrokna útsetta skattaskyldu innan fyri somu løgfrøðiligu skattaeind. Møgulig útsett netto-skattaáogn verður tikin við til nettorealisatiónsvirðið.

Útsettur skattur verður virðisásettur við støði í teimum skattareglum og skattasatsum, sum eru galdandi við roknskaparlok.

Broytingar í útsetta skattinum, sum standast av broytingum í skattasatsum, verða innroknaðar í rakstrarroknskapin.

### Aðrar avsettar skyldur

Avsettar skyldur umfata væntaðar kostnaðir av ábyrgdarskyldum, tap upp uppá arbeiði í gerð, umskipanir v.m. Avsettar skyldur verða innroknaðar, tá felagið hevur eina rættarliga ella ítøkiliga skyldu orsakað av einari hending, sum hevur verið, og tað er sannlíkt, at skyldan verður avgreidd við, at brúkt verður av fíggjarligu ognunum hjá felagnum.

Avsettar skyldur verða virðisásettar til nettorealisatiónsvirði ella til dagsvirði, tá tað er væntandi, at skyldan skal avgreiðast í fjarari framtíð.

### Avleidd fíggjarlig amboð

Felagið nýtir avleidd fíggjarlig amboð til at tryggja gjaldoyraváða, oljuprísváða og rentuváða.

Avleidd fíggjarlig amboð verða upprunaliga innroknað til dagsprís, og beinleiðis transaktiónskostnaðir verða innroknaðir í raksturin. Aftaná upprunaligu innrokningina verða avleidd fíggjarlig amboð innroknað til dagsprís, og broytingar í virðinum verða innroknaðar sum greitt frá í tí fylgjandi. Felagið hevur ikki handilslig avleidd fíggjarlig amboð.

Handilslig avleidd fíggjarlig amboð verða roknað sum stuttfreistað aktiv ella passiv. Dagsvirði av einari trygging verður roknað sum langfreistað aktiv ella passiv, um tryggingartíðarskeiðið er longri enn 12 mánaðir og, sum stuttfreistað aktiv ella passiv, um tryggingartíðarskeiðið er styttri enn 12 mánaðir.

### Gjaldføristrygging

Broytingar í dagsprísi á avleiddum tryggingaramboði nýtt til gjaldføristrygging verða innroknaðar beinleiðis í eginognina í tann mun, tryggingin er effektiv. Í tann mun at tryggingin er óeffektiv, verða broytingar í dagsprísi innroknaðar í vinning ella tap.

Um tryggingaramboðið ikki longur lýkur treytirnar fyri innrokning av trygging, gongur út ella verður selt, verður uppsagt ella nýtt, heldur innrokningin uppat. Akkumuleraður vinningur ella tap innroknað í eginognina verður verandi har, inntil ætlaða transaktiónin fer fram. Tá tryggjaða upphæddin viðvíkur eini ikki-fíggjarligari ogn, verður upphæddin innroknað í eginognina flutt til bókaða virðið á ognini. Í øðrum førum verður upphæddin innroknað í eginognina flutt til vinning ella tap í tí tíðarskeiði, sum tryggjaða ognin hevur við sær vinning ella tap.

## Skuld

Í sambandi við lántøku verður fíggjarlig skuld innroknað til útveganarvirðið svarandi til móttiknu upphæddina eftir frádrignan handilskostnað. Eftirfylgjandi tíðarskeið verður fíggjarlig skuld innroknað til amortiserað útveganarvirði, sum svarar til kapitaliseraða virðið við effektivu rentuni soleiðis, at munurin millum móttiknu upphæddina og áljóðandi virðið, verður innroknaður í rakstrarroknskapin yvir lánitíðarskeiðið.

Skuld til realkredittstovnar og peningastovnar verður virðisásett til amortiserað útveganarvirði, sum svarar til restskuldina, tá talan er um kontantlán. Viðvíkjandi lánsbrævalánum verður amortiserað útveganarvirði roknað sum kontantvirði á lánsupptøkudegnum, javnað við gjørdum avskrivingum í avdráttartíðarskeiðnum av kursjavningini av láninum á upptøkudegnum.

Onnur skuld verður tikin við til amortiserað útveganarvirði, sum vanliga er áljóðandi virðið.

## Peningastreymsuppgerð

Peningastreymsuppgerðin verður uppsett eftir óbeinleiðis háttinum og vísir peningastreymar frá rakstri, íløgum, fígging, broyting í peningastreymum og tøkan pening við ársbyrjan og enda.

Peningastreymar frá rakstri eru tillagaðir fyri ikki likvidar rakstrarpostar, broyting í rakstrarkapitali og goldnan skatt.

Peningastreymar frá íløgum umfata keyp og sølu av immateriellari, materiellari og fíggjarligari støðisogn mótroknað broytingum í áogn og skuld viðvíkjandi nevndu postum.

Peningastreymar frá fígging umfata fígging frá eigara, goldnum vinningsbýti til eigara og upptøku av láni og avdráttir av langfreistaðari skuld, umframt trekk upp á kassakredittir.

Tøkur peningur við ársbyrjan og enda er kassapeningur og innistandandi í peningastovnum.

## Lyklatøl

Lyklatøl eru útroknað í samsvari við Den Danske Finansanalytikerforenings „Anbefalinger & Nøgletal 2010".

Høvuðs- og lyklatølini í yvirlitinum eru roknað soleiðis:

$$\text{Renting av eginogn} \quad \frac{\text{Úrslit}}{\text{Miðal eginogn x 100}}$$

$$\text{Ognarumferð} \quad \frac{\text{Nettoumsetningur}}{\text{Aktiv tilsamans}}$$

$$\text{Eginognarpartur} \quad \frac{\text{Eginogn ultimo x 100}}{\text{Aktiv tilsamans}}$$

# Rakstrarroknskapur

| | Nota | 2018 DKK | *2017 t. DKK* |
|---|---|---|---|
| **Nettosøla** | 1 | **259.063.153** | ***279.101*** |
| Oljuútreiðslur | 2 | -105.521.710 | *-84.507* |
| Tilfar og tænastuveitingar | 3 | -22.356.136 | *-25.046* |
| **Bruttovinningur** | | **131.185.306** | ***169.548*** |
| Starvsfólkaútreiðslur | 4 | -36.699.519 | *-33.896* |
| Av- og niðurskriving av materiellari støðisogn | | -74.221.249 | *-67.823* |
| **Rakstrarúrslit** | | **20.264.538** | ***67.830*** |
| Aðrir fíggjarligir kostnaðir | 5 | -9.339.987 | *-9.488* |
| **Úrslit áðrenn skatt** | | **10.924.551** | ***58.342*** |
| Skattur av ársúrsliti | 6 | -274.080 | *-558* |
| **Ársúrslit** | | **10.650.471** | ***57.784*** |
| **Uppskot til býti av úrsliti:** | | | |
| Flutt úrslit | | **10.650.471** | *57.784* |
| **Býti tilsamans** | | **10.650.471** | ***57.784*** |

# Fíggjarstøða 31. desember

| OGN | Nota | 31.12.18 DKK | *31.12.17 t. DKK* |
|---|---|---|---|
| Framleiðsluvirkir | 7, 14 | 1.006.298.565 | *949.800* |
| Bygningar og jarðarøkir | 7 | 4.616.586 | *8.711* |
| Rakstrargøgn | 7 | 1.679.738 | *1.299* |
| Íløguarbeiði í gerð | | 514.203.956 | *363.016* |
| **Materiell støðisogn tilsamans** | | **1.526.798.846** | ***1.322.827*** |
| **Støðisogn tilsamans** | | **1.526.798.846** | ***1.322.827*** |
| Olja | | 24.183.568 | *16.671* |
| **Vørugoymslur tilsamans** | | **24.183.568** | ***16.671*** |
| Vøru- og tænastuáogn | | 296.294 | *0* |
| Millumrokning Net | | 8.603.697 | *8.202* |
| Skattaáogn | 6 | 134.364 | *7* |
| Tíðaravmarkingar | | 5.743.461 | *234* |
| **Áogn tilsamans** | | **14.777.816** | ***8.444*** |
| **Ogn í umferð tilsamans** | | **38.961.385** | ***25.114*** |
| **Aktiv tilsamans** | | **1.565.760.231** | ***1.347.941*** |

# Fíggjarstøða

| SKYLDUR | Nota | 31.12.18 DKK | *31.12.17 t. DKK* |
|---|---|---|---|
| Partapeningur | 8 | 29.000.000 | *29.000* |
| Flutt úrslit | 8 | 760.767.040 | *750.117* |
| **EGINOGN TILSAMANS** | | **789.767.040** | ***779.117*** |
| Avsetingar til útsettan skatt | 6 | 1.105.431 | *704* |
| **Avsetingar tilsamans** | | **1.105.431** | ***704*** |
| Langfreistað skuld | 9 | 437.368.796 | *445.800* |
| **Langfreistað skuld tilsamans** | | **437.368.796** | ***445.800*** |
| Stuttfreistaður partur av langfreistaðari skuld | 9 | 8.431.280 | *8.248* |
| Millumrokning Net | | 324.155.214 | *110.665* |
| Onnur skuld | | 4.932.470 | *3.407* |
| **Stuttfreistað skuld tilsamans** | | **337.518.964** | ***122.320*** |
| **SKULD TILSAMANS** | | **774.887.760** | ***568.120*** |
| **SKYLDUR TILSAMANS** | | **1.565.760.231** | ***1.347.941*** |

| | |
|---|---|
| Framleiðsluúrslit á virkir | 10 |
| Maskinyvirlit | 11 |
| Veðsetingar og aðrar skyldur | 12 |

# Peningastreymsuppgerð

| | Nota | *2018*<br>*DKK* | *2017*<br>*t. DKK* |
|---|---|---|---|
| **Ársúrslit** | | **10.650.471** | ***57.784*** |
| Reguleringar | 13 | 83.835.316 | *77.869* |
| Broyting í rakstrarpeningi | | | |
| Vørugoymslur | | -7.513.020 | *-1.584* |
| Áogn | | -423.611 | 0 |
| Millumrokning Net | | 216.815.730 | *145.452* |
| Onnur skuld | | -3.582.494 | *5.772* |
| **Peningastreymar frá rakstri áðrenn fíggjarligar postar** | | **299.782.391** | ***285.293*** |
| Goldin rentukostnaður og líknandi kostnaðir | | -9.339.987 | *-9.488* |
| **Peningastreymar frá rakstrinum** | | **290.442.405** | ***275.805*** |
| Keyp av materiellari støðisogn | | -131.006.891 | *-64.111* |
| Broyting arbeiði í gerð | | -151.187.778 | *-203.626* |
| **Peningastreymar frá íløgum** | | **-282.194.668** | ***-267.737*** |
| Avdráttir upp á langfreistaða skuld | | -8.247.736 | *-8.068* |
| **Peningastreymar frá fígging** | | **-8.247.736** | ***-8.068*** |
| **Samlaðir peningastreymar í árinum** | | 0 | *0* |
| Tøkur peningur við ársbyrjan | | 0 | *0* |
| **Tøkur peningur við árslok** | | **0** | ***0*** |

# Notur

## 1. NETTOUMSETNINGUR

| | 2018 DKK | *2017 t. DKK* |
|---|---|---|
| Egin framleiðsla | 239.722.725 | *262.078* |
| Netábyrgd | 18.836.387 | *16.803* |
| Onnur søla | 504.041 | *221* |
| **Tilsamans** | **259.063.153** | ***279.101*** |

## 2. OLJUÚTREIÐSLUR

| | | |
|---|---|---|
| Gassolja | 12.415.815 | *8.035* |
| Tungolja | 86.195.876 | *70.138* |
| Smyrjiolja | 6.910.019 | *6.334* |
| **Tilsamans** | **105.521.710** | ***84.507*** |

## 3. TILFAR OG TÆNASTUVEITINGAR

| | 2018 DKK | *2017 t. DKK* |
|---|---|---|
| Linjur | 42.276 | *9* |
| Byrging, rør og tunlar | 21.641 | *-22* |
| Tangar og umhvørvi | 246.740 | *251* |
| Maskinur | 8.831.914 | *8.498* |
| El og teknikk | 386.478 | *383* |
| Bygningar og lendi | 696.338 | *1.162* |
| Aðalfundur og nevnd | 383.323 | *186* |
| Kanning og ráðgeving | 4.258.920 | *5.946* |
| Kunningartøkni | 689.188 | *780* |
| Leiðsla og skrivstovuhald | 677.797 | *530* |
| Aðrar rakstrarútreiðslur | 394.814 | *327* |
| Aðrar fyrisitingarútreiðslur | 5.726.706 | *6.995* |
| **Tilsamans** | **22.356.136** | ***25.046*** |

## 4. STARVSFÓLKAÚTREIÐSLUR

| | 2018 DKK | *2017 t. DKK* |
|---|---|---|
| Lønir | 32.581.810 | *29.915* |
| Pensjónir | 2.926.829 | *2.876* |
| Almenn gjøld | 1.190.880 | *1.105* |
| **Tilsamans** | **36.699.519** | ***33.896*** |

| | | |
|---|---|---|
| Starvsfólk við høvuðsinntøku frá SEV | 57 | *55* |
| Ársverk | 66 | *64* |

## 5. FÍGGJARÚTREIÐSLUR

| | 2018 DKK | *2017 t. DKK* |
|---|---|---|
| Rentur, lán og bankaskuld v.m. | 9.339.987 | *9.488* |
| **Tilsamans** | **9.339.987** | ***9.488*** |

## 6. SKATTUR AV ÁRSÚRSLITI

| | | |
|---|---|---|
| Avsett til útsettan skatt | 401.397 | *565* |
| Skattaáogn | -127.317 | *-7* |
| **Tilsamans** | **274.080** | ***558*** |

## 7. MATERIELL STØÐISOGN

| Upphædd í DKK | Framleiðsluvirki | Býtisvirki | Bygningar | Rakstrargøgn | Tils. 2018 | *2017* |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útveganarvirði primo | 2.016.215.707 | 5.359.890 | 5.066.816 | 6.522.125 | 2.033.164.538 | *1.969.053.209* |
| Tilgongd í árinum | 136.569.828 | 0 | 18.762 | 1.598.785 | 138.187.375 | *64.341.356* |
| Frágongd til net | -681.138 | -5.315.428 | 0 | 0 | -5.996.566 | *0* |
| Frágongd í árinum | -6.702.643 | 0 | 0 | -477.841 | -7.180.484 | *-230.027* |
| **Útveganarvirði ultimo** | **2.145.401.754** | **44.463** | **5.085.578** | **7.643.069** | **2.158.174.863** | ***2.033.164.538*** |
| Av- og niðurskriving primo | -1.066.415.644 | -1.376.139 | -339.091 | -5.223.339 | -1.073.354.214 | *-1.005.531.045* |
| Avskrivingar í árinum | -80.052.966 | -1.035 | -129.900 | -1.217.832 | -81.401.733 | *-68.013.596* |
| Fráfluttar avskrivingar | 476.796 | 1.518.694 | 0 | 0 | 1.995.490 | *0* |
| Afturførdar avskrivingar, frágongd | 6.702.643 | 0 | 0 | 477.841 | 7.180.484 | *190.427* |
| Av- og niðurskriving ultimo | -1.139.289.171 | 141.520 | -468.992 | -5.963.331 | -1.145.579.973 | *-1.073.354.214* |
| **Roknskaparligt virði ultimo** | **1.006.112.583** | **185.983** | **4.616.586** | **1.679.738** | **1.012.594.890** | ***959.810.324*** |
| *Roknskaparligt virði ultimo 2017* | *949.800.062* | *3.983.752* | *4.727.725* | *1.298.785* | *959.810.324* | |

| Arbeiði í gerð | Framleiðsluvirki | Býtisvirki | Bygningar | Rakstrargøgn | Tils. 2018 | *2017* |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Arbeiði í gerð primo | 362.516.054 | 0 | 500.125 | 0 | 363.016.179 | *159.390.674* |
| Tilgongd til arbeiði í gerð í árinum | 277.325.525 | 6.563 | 10.960 | 0 | 277.343.048 | *262.247.749* |
| Liðug arbeiði førd til avskrivingar | -126.155.271 | 0 | 0 | 0 | -126.155.271 | *-58.622.244* |
| **Arbeiði í gerð ultimo** | **513.686.309** | **6.563** | **511.085** | **0** | **514.203.956** | ***363.016.179*** |
| *Arbeiði í gerð ultimo 2017* | *362.516.054* | *0* | *500.125* | *0* | *363.016.179* | |
| **Støðisogn ultimo** | **1.519.798.892** | **192.546** | **5.127.671** | **1.679.738** | **1.526.798.846** | ***1.322.826.503*** |
| *Støðisogn ultimo 2017* | *1.312.316.116* | *3.983.752* | *5.227.850* | *1.298.785* | *1.322.826.503* | |

## 8. EGINOGN

| Upphædd í DKK | Partapeningur | Flutt úrslit | Tilsamans |
|---|---|---|---|
| Eginognaruppgerð 01.01.17 - 31.12.17 | | | |
| Salda pr. 01.01.17 | 29.000.000 | 692.332.537 | 721.332.537 |
| Ársúrslit | 0 | 57.784.032 | 57.784.032 |
| Salda pr. 31.12.17 | 29.000.000 | 750.116.569 | 779.116.569 |
| | | | |
| Eginognaruppgerð 01.01.18 - 31.12.18 | | | |
| Salda pr. 01.01.18 | 29.000.000 | 750.116.569 | 779.116.569 |
| Ársúrslit | 0 | 10.650.471 | 10.650.471 |
| Salda pr. 31.12.18 | 29.000.000 | 760.767.040 | 789.767.040 |

## 9. SKULD

| | *Avdráttur fyrsta árið* ***DKK*** | *Restskuld eftir 5 ár* ***DKK*** | *Skuld tilsamans 31.12.18* ***DKK*** | *Skuld tilsamans 31.12.17* *t.* ***DKK*** |
|---|---|---|---|---|
| Langfreistað skuld bankar | 0 | 358.941.000 | 358.941.000 | *358.941* |
| Langfreistað skuld móðurfelag | 8.431.280 | 51.991.394 | 86.859.076 | *95.107* |
| **Tilsamans** | **8.431.280** | **410.932.394** | **445.800.076** | ***454.048*** |

Fyri langfreistað skuld til bankar er eingin avdráttur fyrsta árið, og verandi lániavtala fellur til gjaldingar innan í miðal 7,3 ár. Fyri langfreistað skuld til móðurfelag er avdrátturin roknaður sum eitt annuitetslán yvir ávíkavist 10 og 12 ár frá 2016 hjá dótturfeløgunum.

## 10. FRAMLEIÐSLUÚRSLIT Á VERK (DKK)

| | Inntøkur | Olja | Tilfar | Lønir | Avskriving | Rentur | Skattur | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Sundsverkið | 132.329.704 | -84.205.025 | -9.471.605 | -18.897.149 | -23.308.578 | -1.026.398 | 0 | -4.579.052 |
| Vágsverkið | 34.802.934 | -14.284.194 | -2.062.767 | -5.670.423 | -8.542.363 | -1.624.656 | 0 | 2.618.531 |
| Fossáverkið | 13.154.940 | 0 | -963.338 | -4.881.221 | -4.569.481 | 0 | 0 | 2.740.900 |
| Heygaverkið | 4.372.246 | -25.168 | -326.606 | -342.268 | -2.133.284 | 0 | 0 | 1.544.920 |
| Mýruverkið | 3.496.466 | 0 | -426.428 | -328.440 | -1.465.272 | 0 | 0 | 1.276.326 |
| Eiðisverkið | 34.905.410 | 0 | -1.954.446 | -1.837.002 | -19.780.959 | -4.670.885 | 0 | 6.662.118 |
| Verkið í Botni | 1.171.337 | 0 | -355.492 | -157.547 | -557.300 | 0 | 0 | 100.998 |
| Verkið á Strond | 9.833.923 | -4.323.416 | -974.392 | -2.828.442 | -1.518.143 | -3.558 | 0 | 185.972 |
| Vindorka | 19.645.649 | 0 | -5.578.258 | -128.013 | -10.423.101 | -2.014.490 | -274.080 | 1.227.707 |
| Smáverk | 5.350.544 | -2.683.906 | -242.805 | -1.629.015 | -1.922.767 | 0 | 0 | -1.127.949 |
| **Framleiðsluúrslit** | **259.063.153** | **-105.521.710** | **-22.356.136** | **-36.699.519** | **-74.221.249** | **-9.339.987** | **-274.080** | **10.650.471** |

11. MASKINYVIRLIT VIÐ ÁRSLOK 2018

| Stað | Maskina | MW | Maskintypa | Maskinframleiðari | Rakstrar-evni | Ár | Aldur | Tímar tils. | Tímar 2018 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Botnur** | T1 | 1,00 | Pelton vatnturbina | Voith | Vatn | 1965 | 54 | 202.429 | 2.632 |
| **Botnur** | T2 | 2,00 | Francis vatnturbina | Voith | Vatn | 1966 | 53 | 160.495 | 2.609 |
| **Eiðisverkið** | T1 | 7,00 | Francis vatnturbina | Voith | Vatn | 1987 | 32 | 112.394 | 3.350 |
| **Eiðisverkið** | T2 | 7,00 | Francis vatnturbina | Voith | Vatn | 1987 | 32 | 112.919 | 4.496 |
| **Eiðisverkið** | T3 | 7,70 | Francis vatnturbina | Voith | Vatn | 2012 | 7 | 39.798 | 6.961 |
| **Húsahagi** | T1 | 0,90 | Vindmylla (pitch reg.) | ENERCON | Vindur | 2014 | 5 | 33.639 | 7.892 |
| **Húsahagi** | T2 | 0,90 | Vindmylla (pitch reg.) | ENERCON | Vindur | 2014 | 5 | 32.978 | 7.821 |
| **Húsahagi** | T3 | 0,90 | Vindmylla (pitch reg.) | ENERCON | Vindur | 2014 | 5 | 32.799 | 7.362 |
| **Húsahagi** | T4 | 0,90 | Vindmylla (pitch reg.) | ENERCON | Vindur | 2014 | 5 | 32.898 | 7.750 |
| **Húsahagi** | T5 | 0,90 | Vindmylla (pitch reg.) | ENERCON | Vindur | 2014 | 5 | 32.855 | 7.876 |
| **Húsahagi** | T6 | 0,90 | Vindmylla (pitch reg.) | ENERCON | Vindur | 2014 | 5 | 32.597 | 7.835 |
| **Húsahagi** | T7 | 0,90 | Vindmylla (pitch reg.) | ENERCON | Vindur | 2014 | 5 | 32.073 | 7.553 |
| **Húsahagi** | T8 | 0,90 | Vindmylla (pitch reg.) | ENERCON | Vindur | 2014 | 5 | 32.306 | 7.611 |
| **Húsahagi** | T9 | 0,90 | Vindmylla (pitch reg.) | ENERCON | Vindur | 2014 | 5 | 33.314 | 7.645 |
| **Húsahagi** | T10 | 0,90 | Vindmylla (pitch reg.) | ENERCON | Vindur | 2014 | 5 | 33.364 | 7.668 |
| **Húsahagi** | T11 | 0,90 | Vindmylla (pitch reg.) | ENERCON | Vindur | 2014 | 5 | 33.268 | 7.870 |
| **Húsahagi** | T12 | 0,90 | Vindmylla (pitch reg.) | ENERCON | Vindur | 2014 | 5 | 32.696 | 7.585 |
| **Húsahagi** | T13 | 0,90 | Vindmylla (pitch reg.) | ENERCON | Vindur | 2014 | 5 | 33.596 | 7.346 |
| **Neshagi** | V1 | 0,90 | Vindmylla (pitch reg.) | ENERCON | Vindur | 2012 | 7 | 47.130 | 7.930 |
| **Neshagi** | V2 | 0,90 | Vindmylla (pitch reg.) | ENERCON | Vindur | 2012 | 7 | 47.478 | 7.969 |
| **Neshagi** | V3 | 0,90 | Vindmylla (pitch reg.) | ENERCON | Vindur | 2012 | 7 | 47.335 | 7.847 |
| **Neshagi** | V4 | 0,90 | Vindmylla (pitch reg.) | ENERCON | Vindur | 2012 | 7 | 47.377 | 7.639 |
| **Neshagi** | V5 | 0,90 | Vindmylla (pitch reg.) | ENERCON | Vindur | 2012 | 7 | 47.717 | 8.057 |
| **Neshagi** | V6 | 0,15 | Vindmylla ( fixed pitch) | Nordtank | Vindur | 1993 | 26 | 125.900 | - |
| **Skopunarverkið** | M1 – M3 | 1,83 | 4-T | Mercedes og Deutz | Gassolja | 1984 | | - | - |
| **Småverk** | | 1,70 | 4-T | Deutz, Mercedes, Perkins | Gassolja | | | - | - |
| **Strond** | M3 | 3,60 | 4-T 12 M 453 K | Krupp Mak | Gassolja | 1982 | 37 | 49.455 | 795 |
| **Strond** | T1 | 1,40 | Francis vatnturbina | Sulzer Hydro | Vatn | 1998 | 21 | 66.647 | 4.391 |
| **Sundsverkið** | M1 | 7,85 | 4-T 9M43C | Caterpillar/MaK | Tungolja | 2001 | 18 | 69.957 | 3.977 |
| **Sundsverkið** | M2 | 7,85 | 4-T 9M43C | Caterpillar/MaK | Tungolja | 2004 | 15 | 65.235 | 4.169 |
| **Sundsverkið** | M3A | 2,40 | | MTU | Gassolja | 2015 | 4 | 2.052 | 791 |
| **Sundsverkið** | M3B | 2,40 | | MTU | Gassolja | 2015 | 4 | 1.977 | 775 |
| **Sundsverkið** | M4 | 12,40 | 2-T 12 L55 GSCA | B&W Götaverken | Tungolja | 1983 | 36 | 189.336 | 5.991 |
| **Sundsverkið** | M5 | 12,40 | 2-T 12 L55 GSCA | B&W Götaverken | Tungolja | 1988 | 31 | 166.848 | 6.495 |
| **Vágsverkið** | M1 | 2,70 | 4-T 9 M 453 | Krupp Mak | Tungolja | 1983 | 36 | 121.082 | 169 |
| **Vágsverkið** | M2 | 2,70 | 4-T 9 M 453 | Krupp Mak | Tungolja | 1983 | 36 | 121.689 | 1.053 |
| **Vágsverkið** | M3 | 4,20 | 4-T 9M32C | Caterpillar/MaK | Tungolja | 2004 | 15 | 87.958 | 4.498 |
| **Vágsverkið** | M4 | 4,00 | 4-T 9L32 | Wartsila | Tungolja | 2016 | 3 | 14.778 | 3.954 |
| **Strond agg.** | M4-M6 | 3,00 | 4- T C1250 D2R (3 stk. containeranlæg) | Cummins Diesel | Gassolja | 2014 | 5 | 1.302 | 4.065 |
| **Vestmanna** | Fossá 1 | 2,10 | Pelton vatnturbina | Maier | Vatn | 1953 | 66 | 227.468 | 2.615 |
| **Vestmanna** | Fossá 2 | 4,20 | Francis vatnturbina | Voith | Vatn | 1956 | 63 | 359.549 | 7.271 |
| **Vestmanna** | Heygav. 1 | 4,90 | Francis vatnturbina | Voith | Vatn | 1963 | 56 | 238.999 | 5.257 |
| **Vestmanna** | Mýruv. 1 | 2,40 | Francis vatnturbina | Voith | Vatn | 1961 | 58 | 387.090 | 7.765 |

## 12. VEÐSETINGAR OG AÐRAR SKYLDUR

Víst verður til ársfrásøgnina hjá Elfelagnum SEV, har veðsetingar, rættarsakir og aðrar møguligar skyldur framganga.

| 13. REGULERINGAR | 2018<br>DKK | *2017*<br>*DKK* |
|---|---|---|
| Avskrivingar | 74.221.249 | 67.823 |
| Rentukostnaðir og líknandi kostnaðir | 9.339.987 | 9.488 |
| Skattur | 274.080 | 558 |
| **Tilsamans** | **83.835.316** | **77.869** |

| 14. Útgreining framleiðsluvirkir, ogn | 2018 | *2017* |
|---|---|---|
| Fossáverkið | 29.596.931 | *33.474* |
| Heygaverkið | 21.476.234 | *23.535* |
| Mýruverkið | 16.975.547 | *17.078* |
| Eiðisverkið | 478.645.608 | *496.000* |
| Verkið í Botni | 8.129.609 | *8.334* |
| Vágsverkið | 134.061.903 | *131.857* |
| Verkið á Tvøroyri | 68.114 | *4.993* |
| Sundsverkið | 187.181.104 | *107.285* |
| Skopun | 44.922 | *48* |
| Verkið á Strond | 15.628.713 | *7.666* |
| Vindorkutøkni | 107.032.095 | *116.490* |
| Småverk | 144.475 | *151* |
| Mobilaggregat | 755.072 | *944* |
| Fugloy | 1.765.342 | *1.820* |
| Svínoy | 18.961 | *77* |
| Mykines | 874.070 | *1.029* |
| Hestur | 2.441.170 | 1.936 |
| Koltur | 323.673 | 9 |
| Nólsoy | 8.602 | 9 |
| Skúvoy | 612.904 | *663* |
| Dímun | 327.534 | *385* |
| **Framleiðsluvirkir sambært framleiðsluroknskapinum** | **1.006.112.583** | ***953.784*** |
| Netútgerð o.a. sum partur av framleiðsluvirkjum | 136.228 | *-3.984* |
| **Framleiðsluvirkir sambært samtaksroknskapinum** | **1.006.248.811** | ***949.800*** |

# Elkervið


Motororkuverk
Vatnorkuverk
60 kV Koplingarstøð
20 kV Koplingarstøð
Vindorka
60 kV
20 kV
10 kV
6 kV
Sjókaðal



Elfelagið SEV · Boks 319 · FO-110 Tórshavn · Tlf. 34 68 00 · sev@sev.fo · www.sev.fo